# Sjóvinna

Sjóvinnupolitikkur 2017



# Sjóvinnupolitikkur 2017

Uttanríkis- og Vinnumálaráðið

**Álit – Sjóvinnupolitikkur 2017**
© Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Umbrotið, prentað og heft: Føroyaprent
Útgevari: Uttanríkis- og Vinnumálaráðið 2017

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

# Innihaldsyvirlit

**Inngangur og samandráttur** . . . . . 5
**Tørvur á yvirskipaðari maritimari strategi.** . . . . . 5
**Tilgongdin at orða politikkin.** . . . . . 5
**Bygnaðurin í álitinum** . . . . . 6
**Niðurstøða og tilmæli** . . . . . 6
**Kap. 1 Sjóvinnupolitikkur** . . . . . 8
1.1 Endamálið við at orða sjóvinnupolitikk . . . . . 8
1.2 Visjón og mál . . . . . 9
1.3 Hvussu røkka vit visjónini? . . . . . 9
**Kap. 2 Føroyska Altjóða Skipaskráin** . . . . . 10
2.1 Føroyar skulu liva upp til altjóða krøv
innan heilsu, trygd og umhvørvi á sjónum . . . . . 9
2.1.1 ILO og IMO . . . . . 10
2.1.2 Port State Control og Paris MoU . . . . . 11
2.1.3 Aldursmark . . . . . 12
2.2 Marknaðarføring av FAS skipanini. . . . . . 12
2.3 Skattligar/fíggjarligar treytir og avleitt virksemi o.a. . . . . . 13
2.3.1 Treytir fyri skráseting í FAS, skattlig viðurskifti o.a. . . . . . 13
2.3.2 Inntøkur frá skatti, avleiddum vinnum o.a. . . . . . 15
2.4 Avtalur við onnur lond . . . . . 16
2.4.1 Cabotagu sigling . . . . . 16
2.4.2 Góðkenning av útlendskum sjóvinnubrøvum o.a. . . . . . 16
**Kap. 3 Førleikar, útbúgvingar og skeiðstilboð** . . . . . 18
3.1 Orða yvirskipaða ætlan og greiðan bygnað
fyri maritima útbúgvingarøkið . . . . . 18
3.2 Innihald og uppstigan av martimum útbúgvingum . . . . . 19
3.2.1 Verandi skipan og innihald í útbúgvingunum . . . . . 19
3.2.2 Neyðugt at lyfta útbúgvingarnar upp á bachelor støði. . . . . . 20
3.2.3 Samstarv millum Vinnuháskúlan og Fróðskaparsetrið . . . . . 21
3.2.4 Neyðugt við gransking á maritima økinum . . . . . 22
3.3 Skeiðstilboð . . . . . 22
3.4 Miðnámsskúlar bjóða útbúgvingar innan shipping,
logistikk og miðnámssskeið út . . . . . 22

**Kap. 4 Vinnuframaskipanir og atgongd til váðafúsan kapital . . . . . . . . . . . . . . . . 24**
4.1 Vinnuframaskipanir til maritimu vinnurnar . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24
4.1.1 Ráðgeving . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24
4.1.2 Stuðul til menning . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24
4.1.3 Íløgufígging . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 24
4.2 Almennar skipanir og játtanir, ið kunnu beinast til felags átøk fyri maritima geiran . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 25
**Kap. 5 Útinnan av tilmælunum og onnur maritim átøk . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 26**
5.1 Orða yvirskipaða maritima strategi . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 26
5.2 Endurstovna Maritimt Forum . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 27
5.3 Shipping ráðstevna . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 27
**Fylgiskjal 1 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 28**
**Orðalisti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 28**
**Fylgiskjal 2 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 29**
**Fundaryvirlit . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 29**
**Fylgiskjal 3 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 30**
**Keldulisti . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 30**
**Fylgiskjal 4 . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 31**
**Yvirlit yvir høvuðsniðurstøður- og átøk . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . . 31**

# Inngangur og samandráttur

## Tørvur á yvirskipaðari maritimari strategi

*Navigare necesse est, – tað er neyðugt at sigla. Men áðrenn tú leggur frá landi, er neyðugt at seta út í kortið.*

Grannalond okkara, sum við stoltleika kalla seg siglandi tjóðir, hava eina orðaða maritima strategi, har greið mál eru sett fyri, hvussu tey framhaldandi kunnu teljast millum heimsins fremstu sjóvinnutjóðir. Føroyar, hvørs høvuðsvinnur og atknýttar vinnur í so stóran mun eru knýttar at sjónum, eiga sjálvsagt at hava eina yvirskipaða maritima strategi. Ein slík strategi skal seta greið mál um, at Føroyar vilja vera í oddinum, tá ið tað snýr seg um burðardygd, um virðisøking, vitanarskapan, og hvussu vit fáa fleiri vinnur tengdar at sjónum. Tá málið er sett, greina vit okkum fram til, hvussu vit røkka málinum. Tað er hetta ein strategi, ella ein langtíðarætlan, snýr seg um.

Hetta álit fevnir, samsvarandi arbeiðssetninginum, um sjóvegis handilsskipavinnu ella shipping vinnu, útbúgvingar innan maritima vinnu og avleiddar vinnur beinleiðis tengdar at hesum. Sostatt fevnir hetta álit um ein part av teimum økjum, sum hóskandi kundu verið í einari samlaðari maritimari strategi. Men tað merkir ikki, at tað er neyðugt at bíða við at útinna tilmælini í hesum áliti, til ein maritim strategi, ið fevnir meiri breitt, er orðað. Mælt verður staðiliga til, at fara beint undir at fremja átøkini í hesum áliti, tí tey stuðla undir, og eru týðandi liður í einari komandi samlaðari maritimari strategi.

## Tilgongdin at orða politikkin

Landsstýrismaðurin í Uttanríkis- og vinnumálum setti í januar 2016 ein arbeiðsbólk við umboðum fyri viðkomandi myndugleikar og vinnuna at dagføra sjóvinnupolitikkin og gera eina maritima strategi fyri Føroyar.

Ítøkiligi arbeiðssetningurin hjá bólkinum er, at

***orða eina maritima strategi fyri Føroyar og herundir lýsa fylgjandi tættir:***

- ***Hvussu kann FAS skipanin framhaldandi vera kappingarfør***
- **Útbúgvingarmøguleikar**
- ***Skapa fleiri avleiddar vinnur***

*Arbeiðsbólkurin og arbeiðsgongd*
Tey sum hava sitið í arbeiðsbólkinum eru:
Anna Borg Dahl og Gunvør Balle frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum hava leitt arbeiðið
Esther Dahl, ráðgevi fyri Reiðarafelagið fyri Farmaskip
Hans Johannes á Brúgv, stjóri í Sjóvinnustýrinum
Páll Hansen, umboð fyri Faroese Maritime Union
Wilhelm Petersen, stjóri á Vinnuháskúlanum
Niclas Hovgaard, fulltrúi í Mentamálaráðnum
Petur Alberg Lamhauge, ráðgevi í Fíggjarmálaráðnum

Arbeiðsbólkurin hevur hildið regluligar fundir, ið vóru skipaðir í ymisk evnir. Sum partur av kanningararbeiðinum hevur skrivaratoymið havt fundir við umboð fyri reiðara- og shipping vinnuna og avvarðandi lærustovnar og myndugleikar[1]. Arbeiðið hjá arbeiðsbólkinum byggir í stóran mun víðari á álitið „*Sjóvinnupolitikkur*“ frá juli 2010, „*Álit um bachelorútbúgvingar í*

1 sí fylgiskjal 2: Fundaryvirlit

*Vinnuháskúlanum"* frá juni 2006 og tær royndir, sum FAS-umsitingin, Sjóvinnustýrið, skattamyndugleikar, útbúgvingarskipanin og vinnulívið hava havt hetta tíðarskeiðið, síðani sjøtul av álvara varð settur á at marknaðarføra FAS-skipanina. Íblástur er eisini fingin frá FAS álitinum frá 2006, frá uppriti frá Sjóvinnustýrinum frá 2014 um FAS og frá búskapargreiningum um FAS-skipanina frá 2010 og 2016. Somuleiðis hava vit brúkt frágreiðingini *„Føroyar – eitt land í Arktis frá 2013"*, umframt maritimar frágreiðingar og strategiir, sum grannalondini og ES hava orðað seinastu árini, serliga: „Danmark i arbejde – Vækstplan for det blå Danmark" frá 2012 og „Maritime muligheter – blå vekst for grønn fremtid – Regjeringens maritime strategi", sum norska stjórnin lat úr hondum í 2015. Eisini hevur arbeiðsbólkurin brúkt greiningar og niðurstøður frá „Tilmæli um at kanna møguleikarnar fyri at leggja allar maritimar útbúgvingar saman á einum stað", ið varð handað Mentamálaráðnum í 2010.

## Bygnaðurin í álitinum

Álitið er skipað á tann hátt, at í kapittul 1 er greitt frá endamálinum við politikkinum, og ein visjón er orðað. Í kap. 2, 3 og 4 verða tey átøk viðgjørd, sum skulu til fyri at røkka visjónini.

Kapittul 2 lýsir og viðger FAS skipanina. Herundir, hvussu FAS-skipanin er kappingarfør innan heilsu, trygd og umhvørvi á sjónum. Eisini verður nomið við umsitingarligar karmar og marknaðarføring av FAS skipanini, fíggjarligar treytir o.a.

Kapittul 3 lýsir og viðgerð førleikar og útbúgvingar, herundir verandi maritimar útbúgvingar, hvørji útbúgvingartilboð eru, og hvat skal til fyri at gransking og skeiðs- og útbúgvingartilboð eru á einum nøktandi støði til tess at styrkja Føroyar sum maritiman vitanar- og tænastudepil.

Í kapittul 4 verða vinnuframaskipanir og atgongd til váðafúsan kapital viðgjørd, umframt hvat skal til á hesum øki fyri at maritima vinnan kann menna seg.

Og kapittul 5 nemur við arbeiðið frameftir, m.a. hvussu tryggjað verður, at tilmælini í hesum áliti verða gjørd til veruleika og um týdningin av, at ein yvirskipað maritim strategi, ið fevnir breiðari enn hetta álit, verður orðað. Eisini verður mælt til, at ein maritimur arbeiðsbólkur ella Maritimt Forum verður sett til at seta orð á og mæla til yvirskipað maritim strategisk átøk.

## Niðurstøða og tilmæli

Grundleggjandi fyri, at føroysk sjóvinna kann mennast, er, at yvirskipaðu karmarnir eru væl skipaðir. Tað snýr seg um, at hava einfaldar og kappingarførar karmar – bæði fíggjarliga og í dygd. Tað hevur týdning, at tey, ið ætla at fara undir virksemi innan hesa vinnugrein í Føroyum hava atgongd til kapital og ráðgeving, eins og tað er týdningarmikið at bjóða fram dygdargóðar útbúgvingar og skeið soleiðis, at fleiri og vitanartung størv verða skapt í vinnuni.

Niðurstøðan frá búskapargreining av teimum fyritøkum, ið fáast við shipping- og reiðaravirksemi, er, at tað eru fyritøkur, ið eru staðsettar í Føroyum, ið skapa størstu virðisøkingina fyri samfelagið. Uppgávan er tí fyrst og fremst at stuðla undir og skapa karmar fyri, at fleiri fara undir og leggja reiðaravirksemi í Føroyum.

Innflagging av útlendskum skipum í føroysku skipaskránna, har krav bert er um at hava umboðsmann í landinum, skapar nøkur størv á landi og nakað avleitt virksemi. Tað hevur týdning at fáa fleiri skip inn í skipanina, tí ásannast má, at fleiri dygdarskip í skipaskránni eru við til at lyfta støðið á FAS skipanini til at vera ein dygdarskrá. Við fleiri skipum í skipanini kunnu myndugleikarnir sum frálíður loyva sær at seta størri krøv til reiðaríini, um hvørjar uppgávur skulu loysast í Føroyum, og harvið skapa størri avleitt virksemi. Tí hevur tað týdning, at marknaðarføra FAS skipanina, soleiðis at fleiri útlendsk reiðarí velja at skráseta skip síni í FAS og leggja umsitingarligar uppgávur í Føroyum.

Niðurstøðan er somuleiðis, at verða fleiri skeið og útbúgvingar boðin út innan hetta økið, fer tað við tíðini at skapa áhuga millum fólk at starvast í shipping og sjóvinnuni sum heild, og at

økja um hugin at byrja nýtt virksemi innan maritimar vinnur. Tí er tað umráðandi at raðfesta útbúgving og førleikamenning soleiðis, at arbeiðsmegi við røttum førleikum fæst til vega. Tað snýr seg um at samskipa maritimar útbúgvingar, at uppstiga útbúgvingar til bachelor støði og bjóða fleiri handilsligar útbúgvingar fram, herundir shippingbreyt á miðnámi o.a.

Til tess at tryggja, at ferð veruliga kemur á tær maritimu vinnurnar í Føroyum, mælir arbeiðsbólkurin eisini til, at eitt Maritimt Forum verður skipað og at ein yvirskipað maritim strategi verður orðað. Hetta forum verður bindilið millum almennar myndugleikar og privatu vinnuna og skal verða hoyringspartur og tilmælandi m.a. viðvíkjandi nýggjum maritimum átøkum. Talan skal vera um ein aktivan viðspælara í víðari menningini av føroyskum sjóvinnupolitikki og í aat skipa karmar fyri maritimt virksemi í breiðari merking enn hetta álitið viðger.

# Kap. 1 Sjóvinnupolitikkur

## 1.1 Endamálið við at orða sjóvinnupolitikk

Politikkurin skal vera eitt amboð til at sjóvinnan gerst ein enn størri drívmegi fyri vøkstri í føroyska samfelagnum, enn hon er í dag. Málið er, at politikkurin fer at varpa ljós á vakstrarmøguleikarnar í sjóvinnuni, og at fáa myndugleikar og vinnu at samstarva um at fremja átøkini í hesum áliti.

Gongdin seinastu mongu árini hevur verið, at føroysk arbeiðsmegi og vinnulív flytir seg frá fiskivinnu til aðrar skyldar vinnur, sum t.d. tænastur av ymsum slag til sjóvinnuna, so sum shipping, skeiðsvinna og annað[2]. Henda gongd er serliga vorðin týðilig í føroyska samfelagnum eftir at lóggávan viðvíkjandi FAS í 2008 varð dagførd við tí endamáli, at gera skipanina kappingarføra við aðrar skipanir av sama slagi. Broytingin skapti betri karmar og fortreytir fyri, at ein sjóvinna við avleiddum virksemi kundi vaksa fram í Føroyum. Síðani tá er føroyski handilsskipaflotin vaksin úr uml. 40 skipum í 2009 til 87 í januar 2017, ella við uml. 10 skipum um árið í miðal. Hetta hevur havt við sær, at størv á landi tengd at hesi vinnu eru økt, herundir reiðaravirksemi, skeiðsvirksemi, umsiting av manning til skip, lønum, roknskapi, umframt trygging og fígging av virksemi og skipum. Reiðarafelagið fyri Farmaskip er eftir fáum árum blivið eitt av størstu vinnugreina-feløgunum í landinum, við uml. 780 mió. kr. í lønarútgjaldingum undir FAS í 2015.

Hóast ávísa framgongd seinnu árini, kann ein undrast á, at shipping vinnan ikki er størri í einum landi sum Føroyum, ið hevur langar og fjølbroyttar royndir at útbúgva sjófólk, ið eru nógv eftirspurd sum arbeiðsmegi bæði hjá føroyskum og útlendskum arbeiðsgevarum. Nýggjastu greiningarnar av inntøkum frá FAS skipanini[3] vísa, at samlaða talið av innflaggaðum skipum er ikki vaksið stórvegis seinastu 3-4 árini, men tó er vert at viðmerkja, at í 2015 flaggaðu 10 skip inn, men 9 flaggaðu út. Í 2014 góvu avleiddar inntøkur frá FAS-skipanini tí almenna góðar 60 mió. kr. Mett verður, at einir 1500 føroyingar sigla undir einari skipan, ið kann samanberast við FAS í mun til uml. 1000 í 2009. Niðurstøðan ger greitt, at rúm er fyri vøkstri, og nógv fleiri inntøkur kunnu vinnast burturúr FAS-skipanini.

Tað er vorðið ein bygnaðarligur trupulleiki, at skattagrundarlagið í Føroyum er smalkað, tí alt fleiri persónar arbeiða undir skipanum – í Føroyum og uttanlands – har vanligur inntøkuskattur ikki verður goldin til føroyska samfelagið. Tá tað kemur til FAS og sjóvinnu er talan um altjóða vinnu, har arbeiðsmegin sannlíkt vildi farið í aðrar líknandi skipanir uttanlands, um eingin FAS skipan var. Tí snýr tað seg um, at skapa so nógv størv og avleitt virksemi av FAS skipanini á landi í Føroyum sum gjørligt, soleiðis at ein vøkstur í føroyskari sjóvinnu eisini kemur at geva munandi íkast til almennu kassarnar.

Høvuðsdenturin í hesum áliti verður tí lagdur á at lýsa, hvussu føroysk sjó- og flutningsvinna kann vera kappingarfør, og samstundis skapa vøkstur í inntøkum, arbeiðsplássum, innan skeið- og útbúgvingartilboð og í øðrum avleiddum vinnum. Greitt er, at her er talan um eina vinnu, ið krevur langskygda politiska raðfesting, tí tað tekur tíð at byggja røttu førleikarnar upp. Men verður rætt borið at, kann talan verða um eina vinnugrein, ið skapar týðandi virðisøking til føroyska búskapin og samfelagið sum heild.

Tað almenna skal gera sítt við at skapa góðar karmar, men tað er umráðandi, at vinnan loftar møguleikanum, soleiðis at vit kunnu byggja eina týðandi vinnugrein upp.

2 *Í hesum áliti verður orðið shipping brúkt í týdninginum sjóvegis farmaflutningsvinna og útgerðarvirksemi tengt at hesum.*

3 *Frágreiðing hjá Hans Ellefsen og Hera á Rógvu frá mai 2016*

Her eru nøkur av amboðunum, sum tað almenna kann ávirka, fyri at skapa góðar karmar:

- Avgjøld og skattareglur, persóns- og partafelagsskattareglur. (Fíggjarmálaráðið)
- FAS skipanin, sjóvinnulóggáva, herundir krøv til skip, skrásetingar o.a. (Uttanríkis- og vinnumálaráðið)
- Førleikar og útbúgvingar (Mentamálaráðið)
- Tilgongd av og atgongd til skikkaða arbeiðsmegi. Hetta gerst bæði gjøgnum persónsskatt, arbeiðsmarknaðargjøld og útbúgvingar. (Fíggjar- og Mentamálaráðið)
- Atgongd til váðafúsan kapital

## 1.2 Visjón og mál

Visjón:

***Føroysk shipping-vinna skal verða ein týðandi leikari í altjóða høpi, sum skapar avkast, framburð og vælferð.***

Nágreinað merkir hetta, at góðir karmar skulu skapast kring sjóvegis farmaflutningsvinnu, útbúgvingar innan maritima vinnu, og avleiddar vinnur tengdar at hesum, soleiðis at henda vinnugrein er við til at styrkja og fjøltátta búskapin. FAS skipanin hevur ein týðandi leiklut í at røkka hesum málum.

## 1.3 Hvussu røkka vit visjónini?

Fyri at røkka visjónini, skal landsstýrið tryggja sær, at:

Føroyar sum sjóvinnutjóð:

- liva upp til altjóða lóggávu og eftirlit viðvíkjandi heilsu, trygd og umhvørvi á sjónum
- kunnu bjóða kappingarførar skattligar og fíggjarligar treytir
- hava góð tilboð at bjóða innan førleikamenning, útbúgvingar og skeið innan maritima økið
- áhaldandi arbeiða við at menna maritima geiran í Føroyum
- seta neyðuga orku av til miðvísa og áhaldandi marknaðarføring av FAS-skipanini soleiðis, at fleiri skip flagga inn í skipaskránna, tí fleiri skip skapa meira avleitt virksemi og fleiri dygdarskip í skipanini eru við til at lyfta støðið á FAS skipanini til at vera ein dygdarskrá
- skapa karmar fyri góðum vinnuframaskipanum og váðafúsum kapitali, at fíggja shipping- og reiðarívirksemi

# Kap. 2 Føroyska Altjóða Skipaskráin

Føroya Altjóða Skipaskrá (FAS) varð sett á stovn í 1992. Í fleiri øðrum londum er skipaskráseting ein týðandi táttur í búskapinum, og endamálið við FAS var, at skipaeigarar skuldu kunna skráseta síni skip í eini føroyskari skipaskrá til kappingarførar treytir í mun til tær treytir, ið fleiri onnur lond kundu bjóða. Í 2008 varð lóggávan um FAS dagførd við tí endamáli at skapa fyritreytir fyri, at ein sjóvinna við avleiddum virksemi kundi vaksa fram í Føroyum.

Kappingarføri hjá FAS er treytað av

- At lóggáva og eftirlit viðvíkjandi heilsu, trygd og umhvørvi er á einum hóskandi støði.
- At skipanin verður marknaðarførd
- At fíggjarligu treytirnar eru lagaligar og støðugar.

## 2.1 Føroyar skulu liva upp til altjóða krøv innan heilsu, trygd og umhvørvi á sjónum

### *2.1.1 ILO og IMO*

Lóggávan á sjóvinnuøkinum viðvíkjandi m.ø. tekniskum krøvum til skip, útbúgvingar- og manningarviðurskiftum, arbeiðs- og liviumstøðunum umborð á skipum og verju av havumhvørvinum tekur støði í altjóða sáttmálum, sum verða samtyktir av IMO (International Maritime Organisation) og ILO (International Labour Organisation).

Føroyar hava atlimaskap í IMO, og eru tað serstakliga Sjóvinnustýrið og sendistova Føroya í London, sum umboða Føroyar á regluligu fundunum í IMO. Føroyar eru limir í ILO gjøgnum Danmark, men vanligt er ikki at umboð fyri landsstýrið luttekur á fundum í felagsskapinum. Fylgt verður við í ILO málum, og frágreiðingar verða gjørdar til ILO. ILO og IMO konventiónir skulu verða implementeraðar so hvørt, sum tær koma í gildi altjóða. Tað er týdningarmikið, at umboð fyri avvarðandi myndugleikar hava møguleika fyri at luttaka í altjóða fora, sum umrøða og samtykkja reglur fyri skipaferðslu. Hetta fyri at tryggja, at føroysk sjónarmið og áhugamál verða tikin við, tá ið nýggjar altjóða reglur verða ásettar. Tað er eisini eins umráðandi, at altjóða reglur verða implementeraðar í føroyska lóggávu í nóg góðari tíð, innan tær koma í gildi altjóða. Fyri at røkka hesum máli er tað avgerandi, at hetta arbeiðið fær nóg høga raðfesting.

Lóggávan á sjóvinnuøkinum, serstakliga reglurnar við heimild í lógini um trygd á sjónum, eru rúgvismiklar, og er talan um eitt umfatandi tekniskt regluverk um bygging av skipum og útgerð og verju av havumhvørvinum. Sjóvinnustýrið hevur eina lítla umsiting í mun til uppgávurnar hjá stovninum, og tí hevur tað týdning, at stovnurin raðfestur góða samstarvið við hini norðurlondini hægri í sambandi við arbeiðið at seta reglur í gildi á økinum.

**Tilmæli:**

*Føroyska sjóvinnulóggávan eigur framhaldandi at verða dagførd samsvarandi altjóða krøvum, tí hetta er ein fortreyt fyri, at skip undir føroyskum flaggi yvirhøvur kunnu virka á altjóða marknaðinum.*

*Nóg mikið av umsitingarligari orku eigur at vera tøk, soleiðis at dagføringar av sjóvinnulóggávuni verða gjørdar í nóg góðari tíð, og settar í verk til tíðina.*

*Vit eiga at vera varin við at seta national eykakrøv ella serkrøv í gildi, tí hetta kann hava við sær verri kappingarføri fyri skip undir føroyskum flaggi.*

*Sjóvinnustýrið eigur at raðfesta gott samstarv við hini norðurlondini høgt.*

### *2.1.2 Port State Control og Paris MoU*

Paris Mou er ein felagsskapur, har 26 av sjóvinnufyrisitingunum í Europa og Kanada eru limir, men Føroyar eru ikki limir í Paris Mou. Í øðrum pørtum av heiminum eru eisini skipað samstørv um eftirlit við skipum m.a. Tokyo Mou. osfr. Føroyar eru ikki limir í nøkrum av hesum felagsskapum, men tað er mest viðkomandi fyri Føroyar at gerast limir í Paris Mou. Endamálið hjá felagsskapinum er at fremja eftirlit umborð á útlendskum skipum, sum koma í eina Paris Mou havn. Eftirlitið skal staðfesta, um skipini lúka altjóða krøv sambært m.a. SOLAS, MARPOL, STCW og MLC sáttmálunum. Við øðrum orðum verður kannað, um teknisku viðurskiftini á skipinum eru í lagi, at reglur um vernd av umhvørvinum verða hildnar, at manningin hevur kravdu førleikarnar, at hóskandi livi- og arbeiðsumstøður eru umborð, og at kravd sertifikat eru í gildi, og eru umborð. Meginreglan hjá felagsskapinum er, at høvuðsábyrgdin fyri, at krøvini sambært altjóða sáttmálanum verða yvirhildin, er hjá reiðarínum. Ábyrgdin fyri at tryggja, at hesi viðurskifti eru í ordan, er hjá flaggmyndugleikanum.

Tá skip í Føroysku Altjóða Skipaskránni koma í útlendskar havnir koma tey regluliga undir Port State Control. Á hvørjum ári gevur Paris Mou út eina ársfrásøgn, har fløggini eru bólkað í ávíkavist hvítan, gráan og svartan lista, ið fevna um alt frá góðskufløggum til fløgg við vánaligari góðsku, ið verða mett at vera „high" ella „very high risk". Uppgerðin er gjørd útfrá samlaða talinum av eftirlitum og afturhaldum í eitt 3 ára tíðarskeið. Í 2011 komu Føroyar á tann hvíta listan hjá Paris Mou. At vera á hvíta lista hjá Paris Mou er eitt tekin um, at talan er um eitt góðskuflagg.

Tá ið eitt skip hjá einum flagglandi við fáum skipum í skipaskránni verður afturhildið telur hetta nógv tann skeiva vegin, tá ið hagtølini verða gjørd upp. Í mun til eina størri altjóða skipaskrá, hevur tað stóran týdning fyri eina lítla skipaskrá sum FAS, at skip ikki verða afturhildin, tí fleiri afturhald í einum ári kunnu føra til, at føroyska flaggið aftur endar á gráa lista. Skip, sum sigla undir flaggi, ið er á gráa ella svarta listanum koma meira tíðugt undir eftirlit í havnum í Paris Mou.

Sjóvinnustýrið hevur gjøgnum mong ár víst á týdningin av, at Føroyar gerast limir í Paris Mou, men enn hevur hetta ikki borið á mál m.a. vegna vantandi fígging. Árligt limagjald til Paris Mou kostar uml. 350.000 kr., og harafturat er neyðugt at seta tvey ársverk til at røkja eftirlitsuppgávuna og at senda viðkomandi starvsfólk á neyðug skeið. Útfrá hesum verður leystliga mett, at talan er um eina útreiðslu á uml. 2 mi**ó**. kr. um árið. Limaskapur hevði inniborið, at Føroyar, sum havnastatur, hevði havt skyldu til at havt eftirlit við **áví**s**um tali av útlendskum skipum um árið, sum koma í føroyska havn. At vera limur í Paris Mou hevði styrkt myndina av Føroyum, sum ein flaggstatur, ið tekur trygd á sjónum, herundir fyri sjófólk og umhvørvið, í álvara. Við at lima seg inn gerast Føroyar limur saman við 26 øðrum flaggstatum í heiminum, ið saman vilja virka fyri, at vánalig skip, sum ikki liva upp til altjóða trygdarstandardir, ikki sleppa at sigla.

Skip undir føroyskum flaggi, sum í dag sigla millum lond við t.d. farmi til og úr Føroyum, koma javnan undir Port State Control í fremmandum havnum í t.d. Europa. Dømi eru um, at skip undir útlendskum flaggi sigla til og úr Føroyum við farmi, uttan at tey koma undir slíkt eftirlit, tí leiðin gongur úr Føroyum og beinleiðis til lond, ið ikki er partur av Paris Mou. At skip undir útlendskum flaggi sleppa at flyta farm til og úr Føroyum uttan at koma undir Port State Control, og harvið kunnu sleppa undan at lúka krøv í altjóða sáttmálum er, umframt at vera meiri vandafult fyri trygdina á sjónum og fyri umhvørvið, eisini kappingaravlagandi fyri skip undir føroyskum flaggi, sum flyta farm til og úr Føroyum, og eru undir strongum krøvum.

Limaskapur í Paris Mou hevði verið við til at bøtt um trygdina á sjónum í Føroyum og sum heild lyft Føroyar sum sjóvinnutjóð upp á eitt hægri støði.

Í 2011 bað Sjóvinnustýrið IMO kanna, um Føroyar hava sett neyðugar reglur fyri skip í gildi, og um føroyskir myndugleikar fyrisita reglurnar á nøktandi hátt. Eftirlitsfólkini hjá IMO góvu føroyska flaggmyndugleikanum sera góð skoðsmál. Eftirlitsfólk frá IMO koma aftur á eftirlit hjá viðkomandi stovnum í Føroyum í 2022. Góð úrslit frá IMO eftirlitum eru eisini við til at styrkja kappingarføri, tí hetta er nakað, ið viðvirkar til at økja um áhugan fyri føroyska flagginum sum eitt góðskuflagg.

**Tilmæli:**

*Tað er umráðandi fyri virksemið hjá teimum reiðaríum/skipum, sum eru í FAS, og fyri marknaðarføringina av FAS, at flaggið er á hvíta lista hjá Paris Mou.*

*Fyri at røkka málinum um at halda flagginum á hvíta listanum hjá Paris Mou er tað neyðugt, at Sjóvinnustýrið hevur nøktandi arbeiðsorku og rættar førleikar til at hava tað neyðuga eftirlitið og samskiftið við reiðarí og skip um galdandi og nýggjar reglur, sum verða settar í gildi.*

*Mælt verður til, at Føroyar verða limaðar inn í Paris Mou, og at peningur verður játtaður á fíggjarlógini til hetta. Tilmæli eru áður gjørd um hetta, m.a. í frágreiðingini „Føroyar – eitt land í Arktis."*

*Mælt verður til, at føroyskir myndugleikar framhaldandi lata seg góðskumeta av IMO.*

### *2.1.3 Aldursmark*

Løgtingslóg um FAS varð á vári 2011 broytt soleiðis, at Sjóvinnustýrið fekk heimild til at nokta skipum omanfyri ávísan aldur at verða skrásett í skránni. Heimild varð tó til at geva undantak frá ásetingini um sokallaða „20-ára aldursmarkið". Í 2011 var føroyska flaggið á gráa listanum hjá Paris Mou, og 20-ára markið var mett at vera eitt neyðugt átak fyri at forða fyri, at FAS-skipanin ikki fekk fleiri innflaggingar av eldri skipum við vánaligari rakstrarsøgu, sum fóru at hava við sær, at flaggið fór enn longri niður. Um skipanini skuldi vera lív lagað mátti vend koma í. Aktørarnir í vinnuni og myndugleikarnir vóru ikki allir á einum máli um, hvørt tað var rætt at áseta hetta aldursmarkið. Seinni eru allir partar blivnir samdir um, at tað er rætt at hava eina heimild til at nokta skipum omanfyri ávísan aldur at koma inn í FAS-skipanina, men ávís ósemja er um, hvørt galdandi áseting eigur at verða endurskoðað soleiðis, at størri dentur verður lagdur á rakstrasøguna hjá skipinum heldur enn aldurin.

Viðmerking:
*Nevndin er ikki á einum máli um, hvørt sonevnda „aldursmarkið" í lógini eigur at verða endurskoðað soleiðis, at størri dentur verður lagdur á rakstrasøguna hjá skipinum heldur enn aldurin.*

## 2.2 Marknaðarføring av FAS skipanini

Ein FAS skrivstova varð sett á stovn í 2009, og peningur varð játtaður á fíggjarlógini til at marknaðarføra FAS-skipanina. Síðani 2008 er føroyski handilsskipaflotin vaksin úr uml. 30 skipum til uml. 90 skip í 2015. Í 2010 vóru væntanir um, at talið av skipum í FAS longu í 2011 fór at koma upp á 100 skip. Harvið hevur gongdin ikki verið heilt sum væntað, og tí eigur ein ætlan at verða løgd fyri, hvussu størri gongd aftur kemur á innflaggingar í skránna.

Bygnaðarliga liggur umsitingin av FAS, herundir marknaðarføring av skipanini, í Sjóvinnustýrinum saman við aðrari umsiting, ið hevur við innflagging av skipum at gera t.e. sýnsdeildini og manningardeildini. Upprunaliga vóru FAS og Sjóvinnustýrið skipað sum tveir sjálvstøðugir stovnar, men í 2010 varð avgerð tikin um, at leggja stovnarnar saman. Grundgevingin var, at FAS var ein ov lítil stovnur, og fakliga umhvørvið og virksemið sum heild hóskaði væl saman við virkseminum á Sjóvinnustýrinum.

Kjakast kann verða um, hvørt tað er rætt at hesir stovnar liggja saman undir einari leiðslu. Ein spurningur, sum er reistur er, at tað kann hava við sær gegnistrupulleikar, at sami stovnur umsitur sølu og marknaðarføring av einari skipaskrá og samstundis skal góðkenna innflaggingar av skipum útfrá reglum viðvíkjandi trygd. Arbeiðsbólkurin er tó komin til ta niðurstøðu, at, hóast ávísir vansar kunnu vera við verandi bygnaði, eru tað tó fleiri fyrimunir við at halda fast við hesari skipan. M.a orsakað av einum sterkari fakligum umhvørvi, og tí tað ikki er skynsamt at hava nógvar smáar fyrisitingarligar eindir.

Tað er eyðsæð, at tað krevur áhaldandi og støðugt arbeiði at marknaðarføra føroysku FAS-skránna. Tí er tørvur á, at seta nøktandi orku av, bæði arbeiðs- og peningaliga, til at marknaðarføra skipanina úti í heimi. Í 2008 og 2009 vórðu játtaðar 1 mió kr. til marknaðarføring av FAS-skipanini. Í 2010 varð hendan játtanin skorin burtur, og hevur stovnurin ikki síðan fingið serstaka játtan til marknaðarføring. Sjóvinnustýrið hevur tí ikki havt fíggjarligan møguleika til at seta eitt starvsfólk burturav at taka sær av hesi uppgávu, og hevur heldur ikki, eins og áður, havt sama fíggjarliga rúm til at taka lut á messum ella gera onnur marknaðarføringsátøk.

Seinni í frágreiðingini verður víst á, at keyp av vørum og tænastum frá útlendskum reiðaríum við skipum í FAS í 2015 var 24 mió. kr., og er her serliga talan um keyp av tænastum frá umboðsmonnum, herundir lønarumsiting og skeiðsvirksemi, tvs. tænastur, ið skapa størv og virðisøking á landi í Føroyum. Tí er neyðugt, at seta størri orku av til at marknaðarføra FAS skipanina.

---

**Tilmæli:**

- *Peningurin eigur at verða játtaður á fíggjarlógini til annaðhvørt ella bæði hesi tiltøkini:*
- *at seta marknaðarføringsfólk í starv (umframt til útreiðslur til ferðing, messur, framleiðslu av tilfari o.a.)*
- *ella til at keypa tænastu frá umboðsfólkum í ávísum útvaldum støðum kring heimin.*

---

## 2.3 Skattligar/fíggjarligar treytir og avleitt virksemi o.a.

### *2.3.1 Treytir fyri skráseting í FAS, skattlig viðurskifti o.a.*

Skip, sum eru føroysk, og eru 100 BT ella meira, kunnu verða skrásett í FAS. Fyri at verða mett sum føroyskt, má eigarin vera føroyskur t.v.s. skal vera eitt parta-, smápartafelag ella ein vinnurekandi grunnur, skrásettur hjá Skráseting Føroya. Útlendingar kunnu vera eigarar av partapeninginum. Harafturat eru nærri treytir viðvíkjandi skrásetingarmannagongdum, tjóðskaparbrævi, skráseting av rættindum í skipinum og krav um umboðsfólk, sum er búsitandi í Føroyum o.a.

Umsitingarliga er tað lætt at stovna felag í Føroyum, tænastan í sambandi við skráseting av skipum er skjót og góð, og føroyskir skattamyndugleikar hava skjóta avgreiðslu. Karmarnir hava síðani 2008, tá ferð varð sett á at marknaðarføra FAS-skipanina, verið støðugir, og er tað neyðugt, um álit skal vera á skipanina.

Tá hugt verður eftir fíggjarligu kørmunum í FAS skipanini, herundir skattligum treytum og gjøldum, sum tað almenna krevur í sambandi við skráseting v.m., sæst, at skipanin er fíggjarliga kappingarfør við aðrar skipanir av slíkum slag, serliga skipanir í Norðurlondum og í Europa. Bæði viðvíkjandi tonsaskatti, skattaafturbering, partafelagsskatti og gjøldum, sum Sjóvinnustýrið krevur, stendur skipanin seg væl í mun til hesar skipanir. Tó verður mett, at ávís gjøld, sum Sjóvinnustýrið tekur fyri tænastur, eiga at verða endurskoðað. Sæð í mun til skipaskráir hjá øðrum londum so sum Bahamas, Liberia og Panama hevur FAS-skipanin fleiri kostnaðir, og eru hesar skipaskráirnar umboðaðar við skrivstovum ella umboðsfólki kring allan heim.

Reiðarí/feløg, sum hava skip í FAS kunnu velja, um tey ynskja at rinda vanligan partafelagsskatt á 18% ella rinda skatt sambært tonskaskattalógini, har skatturin verður ásettur eftir støðd á skipinum.

Skattligi fyrimunurin hjá reiðaríum at skráseta skipini í FAS er, at tey sambært skattalógini fáa afturborið ein part av útgoldnu hýrunum. Øll sjófólk í skipanini gjalda fast 35% í skatti (bruttoskattur), og henda pening fær reiðaríið aftur frá landskassanum. Skipanin hevur harvið ikki útreiðslur við sær fyri landskassan, men gevur heldur ikki nakra inntøku frá persónsskatti.

Treytirnar fyri, at fáa skatt afturbornan eftir skattalógini er, at persónur ella felag, sum hevur fulla skattskyldu í Føroyum, rindar hýrurnar til persónar undir skattskyldu í Føroyum fyri:

1. Tænastu umborð á skipi, skrásett í FAS.

2. Tænastu umborð á skipi, sum eftir § 2, stk. 1, litra j, 2. pkt. í skattalógini verða javnmett við skip við heimstaði í Føroyum, og sum, um tey vóru føroysk, lúka treytirnar í § 1, stk. 1 í løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá.

Eftir hesi áseting í skattalógini kunnu eisini onnur reiðarí enn tey, sum hava skip síni skrásett í FAS, t.e. reiðarí, sum hava skip síni skrásett í útlendskari skipaskrá, fáa skatt afturbornan frá TAKS.

Hesi skip/reiðarí fáa skattaafturbering:

1. Reiðarí, ið hevur heimstað í Føroyum, og skip skrásett í FAS. (26 skip í 2015)

2. Reiðarí, ið hevur heimstað í Føroyum, og hevur skip skrásett í útlendskari skipaskrá, men skrásett hjá TAKS fyri at fáa skattaafturbering fyri hýrurnar. (22 skip í 2015)

3. Reiðarí, ið hevur heimstað í útlandinum, men felag skrásett í Føroyum, ið hevur skip skrásett í FAS. (56 skip í 2015)

4. Reiðarí, ið hevur heimstað í útlandinum, men felag skrásett í Føroyum, ið hevur skip skrásett í útlendskari skipaskrá, men skrásett hjá TAKS fyri at fáa skattaafturbering fyri hýrurnar. (13 skip í 2015)

Øll tey skip, sum eru skrásett í FAS, eru fevnd av føroyskari lóggávu, og Sjóvinnustýrið hevur eftirlit við, at tey lúka øll krøv, sum skip í FAS skulu lúka. Hesi reiðarí hava rætt til at fáa bornan aftur allan tann skatt, ið manningarnar gjalda í Føroyum.

Skipini, sum ikki eru skrásett í FAS-skipaskránni, fáa eisini bornan aftur allan tann skatt, ið manningarnar gjalda í Føroyum. Ógreiða er um lógargrundarlagið á hesum øki, og kunnleiki er ikki til slíka skipan í londum, ið vit vanliga samanbera okkum við.

Sambært greining av fíggjarligum avleiðingum fyri føroyska samfelagið av at hava eina skipan við afturbering av skatti sæst, at føroyski búskapurin lítið ella einki fær burturúr at útlendsk reiðarí kunnu skráseta síni skip í føroysku skattaskipanini, uttan at flagga skipini inn í FAS. Ein slík skipan kann samstundis vera við til at grannalond fara at síggja Føroyar sum eitt skattaskjól. Við slíkari skipan metir TAKS vanda vera fyri, at londini, har skipini eru skrásett, kunnu krevja føroyska skattavaldið eftir tí skatti, manningarnar á hesum skipum hava goldið til almennu føroysku kassarnar. Harvið kann landskassin koma at standa við einum tapi orsakað av hesi skipanini. Tí er arbeiðsbólkurin samdur um, at hesin skrásetingarháttur eigur at steðgast.

**Tilmæli:**

*Mælt verður til at útfasa møguleikan hjá útlendskum reiðaríum at skráseta síni skip í føroysku skattaskipanini, uttan at tey eisini eru skrásett í føroyskari skipaskrá. Hetta kann verða gjørt á tann hátt, at eingi nýggj skip sleppa inn í hesa skipan, og tey, sum eru inni, fáa eitt áramál til at fara út úr skipanini.*

### 2.3.2 Inntøkur frá skatti, avleiddum vinnum o.a.

Reiðarí í FAS skipanini rindaðu í 2015 íalt 1,6 mió kr. í partafelagsskatti og 300.000 kr í tonsaskatti. Hetta árið vórðu goldnar slakar 58 mió. kr. í lønum fyri arbeiði á landi hjá hesum vinnum. Hetta er peningur, ið økir um virksemið í landinum. Tað, sum lá eftir til almennu føroysku kassarnar í 2015 av persónsskatti, var áleið 25 mió. kr. Í arbeiðsmarknaðargjøldum vórðu í 2015 goldnar 29,7 mio. kr.

Av teimum reiðaríum, sum fáa skattaafturbering, eru tað serstakliga tey reiðaríini, sum hava sítt reiðarívirksemi í Føroyum, sum standa fyri lønarútgjaldingunum til størv á landi í Føroyum. Og somuleiðis eru tað hesi reiðaríini, sum gjalda nógv tann størsta partin av arbeiðsmarknaðar- gjøldunum, sum feløg í hesi vinnu rinda.

Í 2015 vóru goldnar góðar 786 mió. kr. í hýrum og lønum til persónar, sum starvast á sjógvi og landi hjá reiðaríum, ið fáa skattaafturbering frá TAKS. Allar hesar hýrur og lønir eru skattskyldugar í Føroyum, men størsti parturin av skattinum verður borin aftur til reiðaríini. Í 2015 vóru góðar 235 mió. kr. bornar aftur. Í 2015 vóru 291 mió. kr. goldnar í hýrum til føroyingar við skipum í FAS og skipum, sum annars eru skrásett hjá TAKS til at fáa skattafturbering. Her er talan um pening, ið kemur inn í føroyska búskaparrenslið, men sum ivaleyst vildi komið frá øðrum líknandi skipanum, um vit ikki høvdu FAS ella skattaafturberingarskipan hjá TAKS.

Í 2015 keyptu feløg í hesum vinnum fyri slakar 242 mió. kr. í vørum og tænastum frá føroyskum fyritøkum. Ein partur av hesum keypi, sum t.d. keyp av olju, hevur minni ávirkan á føroyska búskapin, meðan keyp av ymiskum tænastum hevur størri ávirkan á búskapin. Aftur her standa føroyskt baseraðu reiðaríini fyri nógv størsta partinum av keypunum av vørum og tænastum í Føroyum, 211 mió. kr. móti 31 mió. kr. hjá útlendskt baseraðum reiðaríum. Størsti posturin hjá føroyskt baseraðum reiðaríum fevnir um havnaútreiðslur, lossing, koyring, vørukeyp, ymiskt reiðarívirksemi og annað atknýtt virksemi.

Útlendskt baserað reiðarí, sum hava skip síni skrásett í FAS, geva eitt ávíst, tó ikki so stórt íkast til føroyska búskapin. Í 2015 keyptu hesi reiðarí vørur og tænastur í Føroyum fyri slakar 24 mió. kr. Størsti posturin fevnir í høvuðsheitum um gjald til føroyskar umboðsmenn fyri ymiskar tænastur, herundir lønarumsiting og skeiðsvirksemi.

Í 2015 vóru tilsamans 5 útlendskt baserað feløg, sum høvdu íalt 13 skip, sum vóru í skattaafturberingarskipanini hjá TAKS, men ikki í FAS. Hesi reiðarí fingu eina skattaafturbering uppá slakar 25 mió. kr. Feløgini keyptu vørur og tænastur í Føroyum fyri íalt góðar 7 mió. kr. Henda skipanin gevur harvið lítið íkast til føroyska búskapin, samstundis sum hon kann verða orsøk til, at grannalond okkara fara at síggja Føroyar sum eitt skattaskjól. TAKS upplýsir eisini, at vandi er fyri, at grannalondini kunnu krevja føroyska skattavaldið eftir tí skatti, manningarnar á hesum skipum hava goldið til almennu føroysku kassarnar.

Í 2014 verður mett, at uml. 1500 føroyingar eru við eini útlendskari skipan, sum minnir um FAS. Í 2014 eru 689 føroyingar við FAS-skrásettum skipum, meðan talið av føroyingum við DIS skipum er 330 og við NIS skipum 413 í 2014.[4]

Føroyingar, ið arbeiða uttanlands, verða skattaðir eftir einum øðrum skattastiga enn føroyingar, ið arbeiða í Føroyum, herundir hjá føroyskum reiðaríum. Hesin skattastigi hevur ein botnfrádrátt uppá 120.000 krónur, og inntøkan omanfyri henda botnfrádrátt verður skattað við 35 prosentum. Hetta gevur føroyskum arbeiðsgevarum – føroyskum reiðaríum (FAS) – avbjóðingar í mun til at kappast við útlendskar arbeiðsgevarar/reiðarí um føroysku arbeiðsmegina. Frágreiðingin „Føroyar eitt land í Arktis" vísir á hetta og hevur Føroya Arbeiðsgevarafelag somuleiðis áhaldandi víst á hendan skeivleika. Arbeiðsbólkurin heldur, at skattastigin eigur at verða eins fyri føroyingar, ið starvast í Føroyum og uttanlands.

4 *FAS-frágreiðing frá Hans Ellefsen og Hera á Rógvi frá mai 2016*

**Tilmæli:**

*Mælt verður til, at skipanin viðvíkjandi skattaafturbering verður endurskoðað soleiðis, at møguleikin hjá útlendskum og føroyskum reiðaríum at hava skip í skattafturberingarskipanini, men ikki í FAS, sum frálíður verður settur úr gildi.*

*Mælt verður til, at føroyingar, ið arbeiða uttanlands, ikki verða skattaðir eftir øðrum skattastiga enn føroyingar, ið arbeiða í Føroyum.*

## 2.4 Avtalur við onnur lond

### *2.4.1 Cabotagu sigling*

Føroyar hava sínamillum avtalur við Svøríki og Norra um, at londini kunnu útinna cabotagusigling (rætturin at reka strandasigling) hjá hvørjum øðrum. Cabotagusigling kann harumframt fremjast í Danmark og Íslandi, og hevur tað verið siðvenja eisini í Stórabretlandi og Týsklandi. Tó er tað komið fyri, at tað ikki er uttan trupulleikar í Týsklandi.

Í ES er innanhýsis skipan, sum loyvir limalondunum at sigla cabotagu hjá hvørjum øðrum. FAS er, sum aðrar skrásetingar í ikki-ES londum, ikki umfatað av skipanini í ES, sum loyvir limalondunum og londum, sum eru partar av EBS at útinna cabotagu sigling hjá hvørjum øðrum. Skip undir føroyskum flaggi kunnu, sum onnur ikki-limalond, søkja um loyvi til slíka sigling í hvørjum einstøkum føri. Henda loysn riggar neyvan í verki, tí flest øll ES-lond, uttan tey, sum eru nevnd omanfyri, tykjast vera sera afturhaldandi við at lata slík loyvi. Hetta er serliga galdandi fyri Frankaríki og Spaniu, men helst eisini fyri miðalhavslondini annars, herundir Portugal og Italia.

Hetta merkir í veruleikanum, at skip undir føroyskum flaggi kunnu sigla cabotagu í øllum Norðurlondum uttan Finnlandi, og eftir siðvenju kunnu tey eisini tað í Stórabretlandi og Týsklandi, tó at tað stundum eru trupulleikar í Týsklandi. Lond sum ikki eru limir í ES ella EBS hava ikki fingið seravtalur við ES um cabotagu. Seinnu árini hava Vinnumálaráðið og Sjóvinnustýrið heitt á Uttanríkistænastuna um at raðfesta arbeiðið at fáa cabotagu-avtalur í lag. Enn hevur ikki borið á mál við hesum.

Cabotagusigling í ES er ein partur av tænastumarknaðinum í ES. Tað hevur verið mett at vera rættiliga ivingarsamt, um tað ber til hjá ES og Føroyum at gera seravtalu um cabotagusigling, vísandi til at tað neyvan er sambæriligt við WTO-rættin at liberalisera ein so avmarkaðan part av tænastumarknaðinum. Av tí sama hevur ynski um cabotagu sigling í staðin verið tikin inn sum eitt mál/ynski í tær fyrireikingar til samráðingar við ES um eina nýggja avtalu, sum Uttanríkistænastan hevur arbeitt við tey seinastu tvey árini ella so. Í fyrstu syftu verður málið um eina nýggju avtalu við ES lagt fyri landsstýrið til støðutakan. Eftir ætlan verður so farið undir samráðingar við ES í 2017. Her kundu Føroyar víst á skipanina hjá Gibraltar, sum hevur eitt serligt tilknýti til eitt ES-limaland nevniliga Stóra Bretland (enn) og til grein 35 í okkara handilsavtalu við ES, sum tilskilar, at avtalur um víðkan til onnur øki (sum t.d. cabotagu) kunnu gerast um partarnir ynskja tað.

### *2.4.2 Góðkenning av útlendskum sjóvinnubrøvum o.a.*

Mannagongdin hjá Sjóvinnustýrunum í sambandi við góðkenning av útlendskum sjóvinnubrøvum er, at Sjóvinnustýrið góðkennir sjóvinnubrøv úr teimum londum, sum Danmark hevur góðkent. Hetta skyldast m.a. at Føroyar og Danmark hava eina „líkastillingsavtalu". Í ávísum førum hava Føroyar havt ynski um at viðurkenna sjóvinnubrøv úr londum, sum Danmark ikki hevur viðurkent, tí áhugi hevur verið frá reiðaríum í viðkomandi londum at flagga skip inn í FAS. Tað hevur tí týdning fyri FAS, at føroyskir myndugleikar sjálvir fara inn í viðgerðina av, um vinnubrøv úr ávísum londum skulu fáa viðurkenning. Tá mugu fyrilit tó vera fyri, at Føroyar hava líkastillingsavtalu við Danmark, og at hendan verður vird.

Fyri føroyska vinnu sum heild, og harvið eisini føroysk reiðarí, hevði tað verið ein fyrimunur, um Føroyar fingu dupultskattaavtalur við fleiri lond. Hetta ynski er javnan ført fram frá vinnuni til Fíggjarmálaráðið.

---

**Tilmæli:**

*Mælt verður til, at farið verður meira miðvíst til verka at fáa í lag avtalu við ES ella við einstøk lond í ES um cabotagu-sigling. Sjóvinnustýrið eigur at taka stig til hvørji lond tað hevur størst týdning at byrja við og saman við td. sendistovu Føroya í Brússel eiga fundir at fáast í lag.*

*Mælt verður til, at Sjóvinnustýrið finnur ein leist fyri, hvussu trupulleikin viðvíkjandi viðurkenning av útlendskum vinnubrøvum verður loystur.*

*Mælt verður til, at arbeiðið at gera fleiri dupultskattaavtalur verður raðfest.*

---

# Kap. 3 Førleikar, útbúgvingar og skeiðstilboð

Ein fortreyt fyri, at sjóvinnan og avleitt virksemi gerst ein týðandi vinnugrein er, at vit leggja okkum eftir at útbúgva arbeiðsmegi soleiðis, at arbeiðsmegin hevur røttu førleikarnar til størv innan hesar vinnugreinar, og soleiðis kann vera við til at menna føroyskt vinnulív. Til tess krevjast dygdargóðar og viðkomandi maritimar útbúgvingar og skeið á øllum stigum. Umráðandi er, at útbúgvingar og skeið støðugt verða lagað til soleiðis, at tey innihaldsliga samsvara við altjóða krøv (frá IMO), og at tey fylgja altjóða stigsetingum (Bologna) og at hetta verður gjørt í tøttum samstarvi við vinnuna.

Føroyingar hava góðar tekniskar og navigasjónsførleikar og siðbundnu maritmu útbúgvingarnar – skipari, skipsførari, maskinist og maskinmeistari – eru dygdargóðar útbúgvingar, ið hava prógvað sítt virði á nær- og fjarleiðum og í størvum á landi. Fyri at tryggja, at arbeiðsmegin hevur fullgóðar førleikar til framtíðar tørvin, er tað umráðandi at høga støðið á teimum siðbundnu maritimu útbúgvingunum verður varðveitt og ment. Hesar útbúgvingar eru sera týdningarmiklar í føroysku sjóvinnuni og hava við sær, at føroysk arbeiðsmegi kann bjóða seg fram á øllum heimsins høvum og londum. Men tað er neyðugt at stíla hægri og eisini fara undir bachelor útbúgvingar til maskinmeistarar og skipsførarar, tí eftirspurningurin er vaksandi eftir at kunna fara beinleiðis undir hægri lestur og til tess krevst útbúgving á bachelorstøði. Logistikk førleikin er vaksandi í føroyskum vinnulívi, men førleikar vanta serliga innan tað kommersiella økið t.d. shipping, og tað kann vera ein týðandi orsøk til, at shipping vinnan ikki hevur størri vøkstur í Føroyum. Tí er neyðugt at skipa útbúgvingar og skeið, ið eru málrættað til hetta økið.

Hesi átøk eru neyðug, fyri at styrkja um teir maritimu og handilsligu førleikarnar:

- *Orða yvirskipaða ætlan fyri bygnað og innihald á maritima útbúgvingarøkinum*

- *Uppstigan av maritimum útbúgvingum*
  - *Bjóða skipsførara- og maskinmeistaraútbúgvingar fram á bachelor stigi.*
  - *Fara undir at fyrireika master útbúgvingar. T.d. master í shipping til skipsførarar og bachelor og master í verkfrøði til maskinmeistarar*

- *Miðnámsskúlar og handilsskúlar bjóða breytir og útbúgvingar út innan shipping og logistikk, umframt miðnámsskeið (Gymnasialt Supplerings Kursus)*

- *Skipa logistikk/shipping útbúgving (eitt ella tvey ár) til tey, ið hava miðnám ella skrivstovuútbúgving*

- *Onnur átøk:*
  - *Autorisasjón av umboðsmonnum / feløgum*
  - *Studning til aspirantar 12 mðr um árið*
  - *Standardiserað skeið*
  - *Sjóvinnubreyt og trygdarskeið fyri 10. floks næmingar*
  - *Seta krøv til reiðarí, við skipum skrásett í FAS, um at taka aspirantar.*

### 3.1 Orða yvirskipaða ætlan og greiðan bygnað fyri maritima útbúgvingarøkið

Sum sjóvinnutjóð burturav, eiga Føroyar at vera í fremstu røð innan maritimar útbúgvingar. Tí er tað alneyðugt at hava eina greiða strategi fyri maritimar útbúgvingar, soleiðis at verandi útbúgvingarstovnar verða fult gagnnýttir og virksemið samskipað.

Í dag eru maritimu útbúgvingarnar førleikagevandi útbúgvingar, sum liggja millum fólkaskúla og hægri útbúgvingar. Útbúgvingarnar og skeiðini eru skipaði sambært altjóða krøvum og hava altjóða IMO-góðkenning. Tveir almennir stovnar veita maritimar útbúgvingar og skeið,

Vinnuháskúlin í Havn og Sjónám í Klaksvík, sum báðir bjóða somu skiparaútbúgving umframt ávís onnur eins skeið.

Vinnuháskúlin bjóðar hesar útbúgvingar og skeið:

- Skipsførari
- Maskinmeistari
- Skipari
- Maskinistur
- Øll kravd skeið

Sjónám bjóðar hesar útbúgvingar og skeið:

- Skipari
- Grundskeið og endaskeið í útbúgving til skipsatstøðara
- Skeið til sjó- og frálandavinnuna v.m.

Trý ymisk álit seinastu 10 árini hava viðgjørt bygnað og innihald í maritimu útbúgvingunum. Í „Álit um bachelorútbúgving á Vinnuháskúlanum" frá juni 2006, „Sjóvinnupolitikkur" frá 2010 og í álitinum „Tilmæli um at leggja allar maritimar útbúgvingar saman á einum stað" frá 2010, verður mælt til at sameina teir báðar skúlarnar undir eina leiðslu og at uppstiga skipsførara- og maskinmeistara- útbúgvingarnar til bachelor stig. Hesin arbeiðsbólkur tekur undir við høvuðsniðurstøðunum í nevndu álitum, men leggur seg ikki út í, hvar í landinum ymsu útbúgvingartilboðini eru staðsett. Hetta er upp til politiska myndugleikan og fyrisitingina at taka støðu til.

Sannroyndin er, at hóast øll hesi álit hava staðfest tað sama, er framvegis eingin yvirskipað ætlan gjørd fyri maritimar útbúgvingar, skúlarnir hava enn sama bygnað, og enn eru maritimu útbúgvingarnar ikki uppstigaðar til bachelor útbúgvingar. Framvegis eru tveir skúlar í landinum, sum lítið og einki samstarv hava og sum í ávísum førum kappast, og mugu keypa tænastur hvør frá øðrum. Fyri at bjóða útbúgvingar og skeið út er neyðugt, at eitt hóskandi næmingagrundarlag er til staðar.

Hesa manglandi yvirskipaðu ætlan metir arbeiðsbólkurin vera eina forðing fyri, at útbúgvingartilboð, ið styrkja teir maritimu førleikarnar, verða sett á stovn. Samstundis er tað eingin ivi um, at tað almenna hevði fingið væl meira burturúr fíggjarliga, um útbúgvingartilboðini vóru betri samskipað. Tá hevði borið til, at skipa fleiri og betri undirvísingartilboð fyri somu játtan.

Tilmæli:
*Mælt verður til, at farið verður undir at fremja tey átøk og tilmæli, ið hetta og eldri frágreiðingar mæla til um bygnað og innihald í maritimum útbúgvingum, herundir at báðir skúlarnir verða skipaðir í ein stovn við einari leiðslu, soleiðis at vit fáa økta menning og skilabetri rakstur.*

## 3.2 Innihald og uppstigan av martimum útbúgvingum

### *3.2.1 Verandi skipan og innihald í útbúgvingunum*

Einki krav hevur verið um miðnámsprógv fyri at sleppa inn á skipara-, skipsførara-, maskinmeistara- og maskinistútbúgvingina, og tí hevur bert ein lítil partur av næmingunum miðnámsútbúgving, tá ið teir byrja. Á sumri í 2015 byrjaði Vinnuháskúlin eina aspirantskipan fyri skipsførarar, og skúlin er í holt við at skipa eina aspirant útbúgving fyri maskinmeistarar eisini. Henda verður væntandi klár í august 2017. Á aspirantskipanini verður krav sett um at hava kravdar lærugreinar á miðnámsstøði fyri at sleppa inn, men einki krav er um siglingartíð,

tí hetta er partur av útbúgvingini. Hetta er fyrstu ferð, at ein aspirantskipan verður roynd í Føroyum, og aftur-meldingarnar eru góðar, bæði frá reiðaríunum og næmingunum. Skipsføraraaspirantar vórðu aftur upptiknir í august 2016.

Innihaldið í sjóvinnuútbúgvingunum er ásett samsvarandi reglum frá IMO, sum Føroyar hava bundið seg til, herundir STCW-sáttmálan. Tá broytingar henda í STCW sáttmálanum er neyðugt at fremja samsvarandi dagføringar í innihaldi í skeiðum og útbúgvingum á sjóvinnuøkinum soleiðis, at føroysku maritimu útbúgvingarstovnarnir kunnu varðveita rættin til at áseta STCW góðkenning í prógvini, sum verða útgivin. Við STCW áteknaðum prógvi ber til at fáa starv kring allan heimin. Staðfestast kann, at meginparturin av føroyskum sjófólki siglir við føroyskum og útlendskum skipum í altjóða sigling, og tí er tað týdningarmikið at raðfesta arbeiðið at dagføra útbúgvingarnar so hvørt nýggj altjóða krøv koma í gildi.

Tað hevur týdning, at útbúgvingarmyndugleikarnir fylgja við í arbeiðinum hjá IMO at áseta krøv til sjóvinnu útbúgvingar, og í hesum sambandi er týðandi at møta til fundir, tá viðkomandi evnir eru á skrá og fylgja við teimum broytingum og tí menning sum fer fram á økinum.

Tí er neyðugt, at Mentamálaráðið setir størri orku av til umsiting av maritimum útbúgvingum enn í dag, soleiðis at tvey størv burturav arbeiða við yvirskipaðum maritimum útbúgvingarpolitikki, skúlabygnaði, fyrireiking av lóggávu, góðkenning av útbúgvingartilboðum og skeiðsvirksemi og at seta í verk altjóða krøv í føroysku útbúgvingarnar. Tað hevur týdning, at tætt samstarv er millum avvarðandi myndugleikar á økinum, herundir Mentamálaráðið, Sjóvinnustýrið og Uttanríkis- og vinnumálaráðið.

---

**Tilmæli:**

*Mælt verður til, at Mentamálaráðið setir størri orku av til umsiting av maritimum útbúgvingum enn í dag, soleiðis at tvey størv burturav arbeiða við yvirskipaðum maritimum útbúgvingarpolitikki, skúlabygnaði, fyrireiking av lóggávu, góðkenning av útbúgvingartilboðum og skeiðsvirksemi og at seta í verk altjóða krøv í føroysku útbúgvingar. Tað hevur týdning, at tætt samstarv er millum avvarðandi myndugleikar á økinum, herundir Mentamálaráðið, Sjóvinnustýrið og Uttanríkis- og vinnumálaráðið.*

---

### *3.2.2 Neyðugt at lyfta útbúgvingarnar upp á bachelor støði*

Henda niðurstøða stendur í „*Álit um bachelorútbúgving á Vinnuháskúlanum*“ frá juni 2006:

*„Maritimu útbúgvingarnar hava alla tíðina, síðani tær komu fyri eini øld síðani, ment seg við samfelagsgongdini. Gongdin í dag í Føroyum og øllum Europa er, at allar hægri útbúgvingar verða skipaðar eftir Bolognaavtaluni. Í grannalondunum eru hægri maritimar útbúgvingar á bachelorstøði, og í Føroyum eru og verða fleiri bachelorútbúgvingar. Føroysk sjófólk eiga at fáa sama møguleika sum aðrir føroyingar og sum sjófólk í grannalondunum. Hesa niðurstøðu koma Vinnuhúsið og føroyskir politikarar eisini til í viðgerðini av Visjón 2015. Bæði fólk við miðnámsprógvi og tey við verkligum royndum skulu hava góðar møguleikar til at fáa ávikavist verkligt og ástøðiligt upptøkuskeið, so tey kunnu fáa eina maritima bachelorútbúgving í Vinnuháskúlanum. Sjófólk, sum ikki ætla sær eina bachelorútbúgving, skulu framvegis hava góðan møguleika at fáa eina styttri maritima útbúgving, sum gevur rættindi til størsta partin av føroyska flotanum.“*

Hesa niðurstøðu tekur arbeiðsbólkurin undir við. Sum nevnt, ber til í Danmark, Noregi, Svøríki og Finlandi at taka maritimar útbúgvingar á bachelorstigi. Tað er ikki ein treyt, sambært IMO reglum, at sjóvinnuútbúgvingar eru skipaðar á bachelorstigi, men hóast tað, hava grannalondini valt at hava eina stigvísa útbúgvingarskipan, har tað er lætt at fara frá einum stigi til annað. Óivað er tað ásannandi, at ungdómurin í dag velir ikki eitt lívsstarv, men eina útbúgving, ið gevur teimum møguleika til víðari útbúgving.

Í Føroyum eru bachelor útbúgvingar alsamt meiri vanligar, síðan bæði sjúkrarøktarfrøði- og lærara- og námsfrøði- útbúgvingarnar eru broyttar til bachelor útbúgvingar og lagdar undir Setrið. Hetta er liður í altjóða gongdini, har alsamt fleiri útbúgvingar verða standardiseraðar, og fylgja tí felags evropeiski skipanini, Bologna avtaluni, ið ásetir, hvussu hægri útbúgvingar verða skipaðar. Her verður ásett, at hægri útbúgvingar verða skipaðar í 3+2+3, har fyrsta stig er bachelor, næsta stig er master og triðja stig er ph.d. Á henda hátt verða útbúgvingarnar kendar úti í heimi, og tað gevur størri møguleikar fyri at sleppa inn at lesa víðari á hægri lærustovnum í Evropa. Tá føroysku skipsførara- og maskinmeistaraútbúgvingarnar gerast partur av almennu standardunum fyri hægri útbúgvingar, verður tað lættari at fáa starv og lesa víðari, har tú vilt og tá tú vilt. Næsta stig eigur tí at verða, at uppstiga maskinmeistara- og skipsføraraútbúgvingarnar til at vera á bachelor stigi.

---

**Tilmæli:**

*Mælt verður til, eins og í eldri álitum, at føroysku skipsførara- og maskinmeistaraútbúgvingarnar skulu uppstigast til bachelor útbúgvingar og harvið gerast partur av almennu standardunum fyri hægri útbúgvingar, t.e. Bologna avtaluni.*

---

### 3.2.3 Samstarv millum Vinnuháskúlan og Fróðskaparsetrið

Vinnuháskúlin og Fróðskaparsetrið eru í eini tilgongd, har stovnarnir í felag kanna, um til ber at menna eina bachelor útbúgving í verkfrøði, har maskinmeistaraútbúgvingin kann innganga sum ein týðandi partur. Um hetta skal lata seg gera verður neyðugt at seta maskinmeistaraútbúgvingina saman á annan hátt (m.a. endurskoða innihald og raðfylgju á lærugreinunum) soleiðis, at ein yvirbygningur á bachelor stigi kann byggjast uppá. Teir maskinmeistarar, ið ynskja at fara víðari til bachelor, skulu taka millum eitt og tvey ár afturat á Setrinum og lutvíst á Vinnuháskúlanum. Á henda hátt kemur tað at taka millum 3,5 og 4,5 ár at lesa BSc í annaðhvørt el- ella maskinverkfrøði.

Tey, ið ikki ynskja at fara víðari til bachelor í verkfrøði, kunnu steðga eftir trý ár (2¼ ár um teir hava miðnám ella viðkomandi fak á miðnámsstigi). Tá fara hesir næmingar út sum vanligir maskinmeistarar. Eftir ætlan verður hendan útbúgving boðin út í august 2017.

Áðrenn útbúgvingin kann bjóðast út er neyðugt at greina smálutirnar nærri, m.a. fáa góðkenning frá Mentamálaráðnum og kanna um Fróðskaparsetrið skal tryggja útbúgvingina í síni heild. Tað er neyðugt, at útbúgvingin lýkur treytirnar í Bologna sáttmálanum, soleiðis at næmingarnir hava trygd fyri, at bachelor útbúgvingin verður góðkend av øðrum hægri lærustovnum til framhaldandi lestur.

Tá ið skúlar og næmingar hava gjørt sær royndir við hesum leisti, kann sama skipan verða brúkt til skipsførarar, soleiðis at hesir eisini fáa møguleika at gerast bachelorar og harvið kunnu søkja inn á master útbúgvingar, t.d. innan shipping, leiðslu ella umsiting.

At Vinnuháskúlin og Fróðskaparsetrið samstarva um at sameina verandi lærugreinar og læraraorku til at bjóða nýggjar útbúgvingar fram, gagnar bæði lesandi og lærustovnum. Hetta er ein gongd leið til framtíðar tættari samstarv, uppstigan og víðkan av maritimum útbúgvingum.

---

**Tilmæli:**

*Fyrireikandi arbeiði, ið er í gongd millum Vinnuháskúlan og Setrið um at geva maskinmeistarum møguleika at uppstigast til bachelorar í el ella maskinverkfrøði, eigur at verða framt í verki.*

---

### 3.2.4 Neyðugt við gransking á maritima økinum

Um og tá hesar nýggju maritimu bachelor útbúgvingarnar verða bodnar fram á Setrinum eigur tað at hava við sær, at farið verður undir at granska, og harvið framleiða nýggja vitan á hesum øki. Einki er meir sjálvsagt, enn at ein maritim tjóð, sum tann føroyska, hevur útbúgvingar og gransking á høgum støði innan tað maritima øki, og hetta kann hava stór framtíðarútlit við sær, serliga tá talan er um at finna umhvørvisvinarligar loysnir á ymsum økjum. Í altjóða høpi ger sjóvinnan stórar íløgur í vælútbúgvið starvsfólk, tí hetta sæst aftur í kappingini á altjóða marknaðinum.

Fyri at Føroyar kunnu bjóða maritimar førleikar á høgum støði er tað tí neyðugt, at verulig ferð verður sett á gransking á hesum øki. Tí verður mælt til, at granskingar- og menningarverkætlanir innan maritima økið verða raðfestar sum eitt innsatsøki innan tær almennu granskingar- og stuðulsskipanirnar.

---

**Tilmæli:**

*Mælt verður til, at granskingar- og menningarverkætlanir innan maritima økið verða raðfestar sum eitt innsatsøki innan tær almennu granskingar- og stuðulsskipanirnar.*

---

## 3.3 Skeiðstilboð

Vinnuháskúlin hevur gjørt munandi uppgraderingar á tí tøknifrøðiliga økinum seinnu árini, serliga innan simulatorar og útgerð og útbúgving knýtt at tí. Vinnuháskúlin er tí í dag á mangan hátt ein leiðandi stovnur av sínum slag í norður Evropa. Skúlin bjóðar fram eina røð av styttri og longum skeiðum tengd at sjóvinnu, eitt nú trygdarskeið, heilsuskeið, brandskeið osfr. Sum er, verða DP og ECTIS skeið boðin fram á enskum og bæði lærarar frá Vinnuháskúlanum og frá privatum veitarum fara umborð á skip kring heimin at halda skeið. Harumframt bjóðar Vinnuháskúlin nøkur skeið sum e-learning, og mett verður so hvørt um, hvar e-learning kann nýtast við fyrimuni. Altjóða skeið til altjóða marknaðin, e-learning o.a eigur at gerast ein munandi størri partur av virkseminum hjá Vinnuháskúlanum. Harumframt bjóðar Sjónám og privatar fyritøkur eisini ymisk skeið til sjóvinnuna, og sum heild eigur tað almenna at skapa góðir karmar fyri dygdargóðum og fjøltáttaðum skeiðsvirksemi.

---

**Tilmæli:**

*Ein greitt orðað útbúgvingarstrategi skal seta mál fyri, at skúlarnir og privatir útbjoðarar í størri mun bjóða skeið fram til altjóða marknaðin, so Føroyar kunnu gera seg galdandi sum maritimur útbúgvingar- og skeiðsdepil fyri sjó- og frálandavinnuna kring heimin. Altjóða skeið til altjóða marknaðin, e-learning o.a eigur at gerast ein munandi størri partur av framtíðar skeiðstilboðunum*

*Mælt verður til, at skúlarnir fáa loyvi til at nýta ta inntøku skúlin hevur av skeiðsvirksemi til menning og íløgur í kravda útgerð, sum er kostnaðarmikil.*

---

## 3.4 Miðnámsskúlar bjóða útbúgvingar innan shipping, logistikk og miðnámssskeið út

Føroyska arbeiðsmegin innan sjóvinnu og tænastur til sjóvinnuna hevur góðar tekniskar førleikar og fleiri og fleiri nema sær førleikar innan logistikk. Men fyri at shipping vinnan kann mennast er serliga tørvur á handilsligum førleikum. Tí er alneyðugt, at útbúgvingar og skeið innan shipping o.a. maritimt virksemi verða ment á øllum stigum.

Innan fleiri yrkisgreinar hevur leingi verið tørvur á einum miðnámsskeiði, á donskum nevnt GSK-skeið (gymnasialt suppleringskursus) fyri øll tey, ið ikki hava miðnámsútbúgving, men sum seinni hava hug at fara undir hægri lestur. Tí eigur MMR saman við miðnámsskúlunum, at gera tað møguligt hjá fólki, ið ikki ganga á miðnámi, at taka ávísar lærugreinar á miðnámsstøði, sum teimum tørva fyri at fara undir hægri útbúgving. Hetta er í samsvari við teir tankar, ið hava verið frammi seinnu árini um lívlanga læring.

Mentamálaráðið og handilsskúlarnir eiga at fyrireika og bjóða shippinglærugreinar út á t.d. búskaparleiðini. Hetta hevði uttan iva havt áhuga millum tey ungu, og kundi kveikt áhugan fyri shippingvinnuni. Somuleiðis eigur at verða kannað, um tann almenna miðnámsútbúgvingin eisini kundi havt maritimar leiðir, við ymsum fakum, ið eru rættað móti maritimum virksemi.

Eisini eigur møguleikin at kannast fyri at skipa eina eitt-ára (kanska tvey ár seinni) logistikk/ shipping útbúgving omaná eina miðnáms- ella yrkisútbúgving. Nógvar fyritøkur og stovnar, ið hava stóran inn- og útflutning hava tørv á logistikk-førleikum, og tí vildi ein slík útbúgving ikki bara verið rættað móti, og havt áhuga, í shipping vinnuni.

---

**Tilmæli:**

*Handilsskúlar, miðnámsskúlar ella kvøldskúlar eiga at skipa fyri, at hesi skeið og útbúgvingar verða boðin út:*

- *Alment miðnámsskeið (GSK)*
- *Shipping lærugreinar á búskaparbreytini og maritima leið á almennu miðnámsbreytini*
- *Skipa eitt ella tvey ára útbúgving innan logistikk og shipping á handilsskúlunum omaná miðnáms- ella yrkisútbúgving.*

---

# Kap. 4 Vinnuframaskipanir og atgongd til váðafúsan kapital

## 4.1 Vinnuframaskipanir til maritimu vinnurnar

Almennu vinnuframaskipanirnar eru amboð at stuðla upp undir vinnuliga menning, eisini í maritima geiranum. Skipanirnar í Føroyum eru hvør sær rættiliga smáar, og í dag eru tær ikki beinleiðis málrættaðar maritimu vinnunum. Møguleikar eru tó at nýta skipanirnar strategiskt saman, og at gera átøk, ið muna.

Vakstrarmøguleikarnir í maritimu vinnunum fevna víða, m.a. um umboðsmannavirksemi og skiparakstur, tænastuvinnur og framleiðslu av útbúnaði, útbúgvingar-og skeiðsvirksemi o.sfr. Fyritøkurnar eru ofta smáar, og spesialiseraðar, men verða maritimu vinnurnar sæddar í einum størri samanhangi, kunnu tær tilsamans verða eitt sterkt lið, ið kann gera seg galdandi á heimsmarknaðinum. Sjóvinnupolitikkurin, og ein maritim heildarætlan, kunnu stuðla upp undir hetta, m.a. við at mæla til átøk, ið kunnu málrætta verandi skipanir.

Vinnuframaskipanirnar fevna um ráðgeving, stuðul til menning og íløgufígging.

### *4.1.1 Ráðgeving*

Ráðgeving kann verða veitt á øllum menningarstigum í fyritøkuni, bæði áðrenn fyritøkan verður sett á stovn og eisini ráðgeving til menning, marknaðarføring og vøkstur. Vinnuframi og Íverksetarahúsið bjóða ókeypis ráðgeving, og eisini kann Vinnuframagrunnurin játta stuðul til at keypa hjálp frá serfrøðingum, ið hava serkunnleikan sum fyritøkuni tørvar.

Umframt skipanirnar hjá landinum, hevur Tórshavnar kommuna eisini sítt íverksetarahús, „Hugskotið", har til ber at leiga skrivstovur og at fáa ráðgeving. Hugskotið ger eisini tiltøk fyri íverksetarum, og arbeiðir tætt saman við vinnuframaskipanini hjá landinum. Eisini aðrar kommunur bjóða stuðul til ráðgeving og innivist.

### *4.1.2 Stuðul til menning*

Frá Vinnuframa ber til at søkja um stuðul til menning av vørum og virkishugskotum. Stuðul kann t.d. verða veittur til ráðgeving í samband við patentumsóknir, fyrireiking til kapitalhækkan og til sølufremjandi tiltøk.

### *4.1.3 Íløgufígging*

Rættiliga stórur áhugi tykist at vera fyri at menna nýggjar vørur og tænastur til sjóvinnuna, og umstøðurnar at menna og at gera verkligar royndir, í tøttum samstarvi við kundarnar, eru góðar. Kortini hava bæði nýskapandi fyritøkur og partarnir í vinnuframaskipanini javnan víst á, at tað er sera tungt at finna váðafúsa fígging í Føroyum.

Stuðulsmøguleikarnar til tey fyrstu menningarstigini hjá einari fyritøku, eru á einari leið, tó at játtanin hjá Vinnuframa er sera avmarkað. Møguleikar eru eisini at fáa íløgufígging, tá ið verkætlanirnar eru somikið búnar, at talan er um veruliga framtaksfígging. Men í teimum mest váðafullu menningarstigunum hjá nýggjum fyritøkum, millum sprota- og framtaksfígging, er sera trupult at finna íleggjarar. Ein møguleiki, ið eigur at vera kannaður nærri er, um almenn átøk kunnu gerast, ið kunnu eggja privatum íleggjarum til at fylla hetta gloppið í fíggingarketuni.

Skal ein størri sjóvinna og shippingvinna byggjast upp í Føroyum, er neyðugt við nøktandi fíggjarligum karmum og vinnuframaskipanum. Reiðarívirksemi er kapitaltung vinna, har váðin

eisini er stórur. Tað er ikki realistiskt at rokna við, at føroysku peningastovnarnir lyfta hesa uppgávu einsamallir. Søgan hevur eisini víst okkum, at tá roynt hevur verið at gjørt framtøk á fiski- og sjóvinnuøkinum, hava føroysku peningastovnarnir bert í avmarkaðan mun verið við.

Í fimtiárunum vóru Føroyar í stórari kreppu fyrst og fremst orsakað av skeivum íløgum, ið gjørdar vóru í fiskifør. Sum hjáp til at koma burtur úr hesi kreppu, var Realurin settur á stovn. Úrslitið var sera gott. Vit fingu eina endurnýggjan av fiskiflotanum, ið gav føroyska samfelagnum eitt veruligt skump framá.

Í áttatiárunum vóru stig tikin til at byggja upp eina sjóvinnu og shipping vinnu í Føroyum. Íløgur vóru gjørdar grundaðar á fígging frá útlendskum fíggjarstovnum. Váðan tók ein størri skarði av føroyingum eftir ymiskum fíggingarmodellum. Átakið miseydnaðist og úrslitið og avleiðingarnar kenna vit. Helst vóru tað ymsar orsøkir til, at átakið miseydaðist, men kapitaliseringin var í hvussu er ein orsøk.

Tað er sum nevnt ikki serliga sannlíkt, at vanligir føroyskir ella útlendskir peningastovnar einsamallir fara inn og fíggja íløgur í eina føroyska sjóvinnu og shipping vinnu. Tí hevur tað týdning, at føroyskir grunnar og kapitalsterkar fyritøkur, møguliga saman við útlendskum samstarvspørtum, fara inn í hesar vinnur og átaka sær váða saman við vanligu peningastovnunum.

## 4.2 Almennar skipanir og játtanir, ið kunnu beinast til felags átøk fyri maritima geiran

Á fíggjarlógini er játtan til marknaðarføring hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, sum lutvíst er ætlað átøkum at marknaðarføra Føroyar sum íløguland, og lutvíst átøkum hjá uttanríkistænastuni og útflutningsráðnum, at styrkja kappingarførið og umdømið hjá Føroyum og føroyskum fyritøkum.

Tað hevði borið til at eyðmerkt og samskipa part av hesari játtan, og at raðfesta part av arbeiðsorkuni í Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, til frama fyri sjóvinnu og maritima geiran sum heild. Til ber eisini at samskipa hesi átøk við aðrar skipanir, sum gera marknaðarføringarátøk fyri partar av maritimu vinnunum t.d. FAS, Maritima tænastudepilin, Jarðfeingi, Oljuvinnufelagið, kommunur, Vinnuháskúlan og Fróðskaparsetrið

Ásannast má tó, at tað kann vera trupult hjá landsstýrinum sjálvum at samskipa marknaðarátøk ið muna, og at røkja viðkomandi netverk. Annað líknandi dømi, ið hevur hepnast munandi betri, er Visit Faroe Islands, sum bæði hevur størri fíggjarorku enn spjøddu vinnuframaskipanirnar hava, men fyrst og fremst hevur nógv størri frælsi at leggja virksemi sítt til rættis, enn embætisverkið hevur.

Eitt tilmæli kundi tí verið, at savna alla almennu orkuna, sum í dag er býtt út á fleiri skipanir, grunnar og játtanir, í ein felags nýskapanar- og vinnuframadepil, við ábyrgd fyri vinnuligari menning og altjóða marknaðarføring av føroyskum vinnum- og vinnugeirum. Eina skipan, sum eins og Visit Faroe Islands í tí dagliga virkar leyst av politisku skipanini. Ein slík skipan eigur tó sjálvandi at samstarva við landsstýrið og at nýta sendistovurnar til tiltøk, ið kunnu lata nýggjar dyr upp fyri føroysku vinnuna.

---

**Tilmæli:**

*Tað eigur at verða kannað, um allar tær smáu almennu vinnuframaskipanirnar kunnu savnast í ein felags nýskapanar- og vinnuframadepil, ið hevur ábyrgd av vinnuligari menning, nýskapan og altjóða marknaðarføring av føroyskum vinnum.*

---

# Kap. 5 Útinnan av tilmælunum og onnur maritim átøk

## 5.1 Orða yvirskipaða maritima strategi

Sum nevnt í innganginum, er tørvur á at fara undir at orða eina maritima heildarætlan fyri Føroyar, har allur maritimi geirin verður umfataður, lýstur og greinaður.

**Talva 1: Tættir í yvirskipaðari maritimari strategi**




Talva 1: Sum talvan vísir, eru nógvir tættir í einari yvirskipaðari maritimari strategi. So hóast ein stórur partur, helst einir tveir triðingar av allari strategiini, er lýstur í hesum báðum álitum frá 2013 og 2017, vanta ávísir partar at verða lýstir, fyri at talan kann vera um eina heildarætlan.

Í frágreiðingini „Føroyar – eitt land í Arktis", ið Landsstýrið lat gera í 2013, verður útgreinað, hvørjir vinnuligur møguleikar, men eisini avbjóðingar, ið økt skipaferðsla til Føroya og í føroyskum sjóøki hevur og kann fáa framyvir. Tilmælini í hesi frágreiðingini bæði viðvíkjandi vinnuligum kørmum, infrakervi, umhvørvisvernd o.ø. eru líka viðkomandi í dag, og eru tey tí eisini ein týðandi partur av einari samlaðari maritimari strategi.

Harumframt eru ávísir tættir, ið enn ikki eru fult lýstir, og sum eiga at vera við í einari maritimari heildarætlan, m.a: Frálanda virksemi, havnir og havnaútbyggingar, lógarkarmar, fígging og vinnuframaskipanir. Eisini mangla tættir innan útbúgving, førleikar og maritimar tænastuvinnur.

Í samgonguskjalinum hjá sitandi landsstýri stendur, at „Føroyar skulu mennast og marknaðarførast sum maritimur tænastudepil og shippingland". Á fíggjarlógini fyri 2016 játtaði Løgtingið 788.000 kr. til marknaðarføring av Føroyum sum maritiman tænastudepil og fyri 2017 hevur Løgtingið játtað 488.000kr til sama endamál. Uttanríkis- og vinnumálaráðið og Oljuvinnufelagið í Vinnuhúsinum (ið samskipar arbeiðið hjá tí Maritima Tænastudeplinum) hava í 2016 gjørt avtalu um, hvat partur av játtanini skal brúkast til soleiðis, at peningurin gagnar maritimu vinnuni á bestan hátt. Arbeiðið við tí maritima tænastudeplinum eigur eisini

at verða partur av tí yvirskipaðu maritimu strategiini fyri Føroyar. Her eigur td. leikluturin hjá stóru havnunum í Føroyum at verða greinaður nærri. Fyri at skapa vøkstur innan shipping og logistikk, er tað avgerandi at tryggja, at fleiri vørur og tænastur verða seldar yvir føroyskan kajkant. Eins og fyritøkurnar á landi eiga havnirnar eisini at vera við til at seta fokus á farmareiðarí (føroysk og útlendsk), og bjóða Føroyar fram sum ein Terminal Hub, har vøra til og frá Europa ella Norður Amerika, kann verða umskipað í Føroyum, fyri síðani at verða flutt til marknaðir í Russlandi, Norra osfr. Hetta virksemi hevði skapt fleiri inntøkur til havnirnar, verið arbeiðsskapandi, og tænastuvinnan hevði notið gott av hesum.

Í 2017 hevur Uttanríkis- og vinnumálaráðið sett arbeiðsorku av til at arbeiða við málinum at greina, hvussu Føroyar kunnu mennast og marknaðarførast sum maritimur tænstudepil og shippingland.

---

**Tilmæli:**

*Mælt verður til, at orða eina samlaða maritima strategi fyri Føroyar. Ein slík eigur at fevna um allar tættir í maritimum virksemi, og verða gjørd í samstarvi við tey, sum eru serkøn innan tey øki, ið mangla at verða lýst í einari samlaðari maritimari strategi.*

---

## 5.2 Endurstovna Maritimt Forum

Til tess at tryggja, at tað framhaldandi verður arbeitt við at menna maritimu vinnuna, mælir arbeiðsbólkurin til, at eitt Maritimt Forum verður (endur) skipað. Maritimt Forum varð stovnað í 2008, men datt niðurfyri eftir nøkrum árum. Í Maritima Forum vóru umboð fyri vinnulív og tað almenna. Tað varð stovnað, tí mett varð, at við góðum samstarvi millum tað privata og tað almenna, kann shipping gerast ein vinna, sum kann geva samfelagnum munandi nýggjar inntøkur.

Eitt endurskipað Maritimt Forum skal vera bindilið millum almennar myndugleikar og privatu vinnuna. Harafturat skal Maritimt Forum vera hoyringspartur og koma við tilmælum, m.a. um at seta nýggj átøk í verk. Tað skal somuleiðis vera við til at tryggja, at avvarðandi myndugleikar og partar fremja tilmælini í hesum áliti. Hetta forum skal eisini vera aktivur viðspælari í víðari menningini av føroyskum sjóvinnupolitikki og maritimum virksemi.

Maritimt Forum kundi verið mannað við umboðum fyri viðkomandi almennar myndugleikar, vinnulív og feløg. Tað er týdningarmikið, at bólkurin er virkisførur og tí ikki er ov stórur. Fyri at Maritimt Forum skal virka, er neyðugt, at Uttanríkis- og vinnumálaráðið setir neyðuga orku av til skrivarauppgávuna og til at samskipa arbeiðið í Maritima Forum.

---

**Tilmæli:**

*Mælt verður til, at Maritimt Forum verður endurstovnað og at Uttanríkis- og vinnumálaráðið átekur sær skrivarauppgávuna.*

---

## 5.3 Shipping ráðstevna

Maritimt Forum eigur at kanna møguleikan fyri, at Føroyar eru vertir fyri einari altjóða sjóvinnu, ella shipping ráðstevnu, sum skal fáa shipping og maritimar tænastur á breddan bæði heima og uttanlands. Á slíkari ráðstevnu fáa vit høvi at marknaðarføra okkum í útheiminum sum eitt land við nógvum tænastum innan sjóvinnu, bæði við altjóða skipaskráseting, við útbúgvingar- og skeiðsmøguleikum og við maritimum tænastum. Um slík ráðstevna er væleydnað kann hugsast, at hon kann endurtakast á øðrum ella triðja hvørjum ári.

# Fylgiskjal 1

## Orðalisti

| | |
|---|---|
| UVMR | Uttanríkis – og vinnumálaráðið |
| FAS | Føroyska Altjóða Skipaskráin |
| IMO | International Maritime Organization |
| STCW | The International Convention on Standards of Training, Certification and Watchkeeping for Seafarers |
| ILO | International Labour Organization |
| Port State Control (PSC) | Skipan av ófráboðaðum eftirliti við skipum, ið koma í fremmanda havn |
| Paris Mou | Paris Memorandum of Understanding |
| ITF | The International Transport Workers' Federation |
| Cabotage | Rættur at reka strandferðslu |
| SOLAS | Convention for the Safety of Life at Sea |
| MARPOL | International Convention for the Prevention of Pollution from Ships |
| MLC | Maritime Labour Convention |
| GSK | Gymnasialt Supplerings Kursus |

# Fylgiskjal 2

## Fundaryvirlit

Tor Shipping: Hentzar Steingrímsson og Joan Mikkelsen

Shipping.fo: Jónas Sigmarsson

Frakt og Sand, Runavík: Álvur Højgaard

Skansi Offshore: Jens Meinhard Rasmussen og Sámal Sivertsen

Faroe Ship: Bogi Nielsen

Smyril Line: Rúni Poulsen og Halgir Dahl Olesen

Sjónám, Klaksvík: Ragnar Ludvig

Føroya Handilsskúli: Bogi Bech Jensen, Finn Jensen og Steinbjørn Hardlei

Svitzer Føroyar: Gunnbjørn Joensen

TAKS: Poula á Líðarenda

FMU, Faroese Maritime Union, Páll Hansen

# Fylgiskjal 3

## Keldulisti

*Føroyar – eitt land í Arktis* frá 2013

*Sjóvinnupolitikkur* frá juli 2010

*Álit um bachelorútbúgvingar í Vinnuháskúlanum* frá juni 2006

*Tilmæli um at kanna møguleikarnar fyri at leggja allar maritimar útbúgvingar saman á einum stað* frá 2010

*Búskapargreiningum um FAS-skipanina* frá 2010

*Inntøkur av FAS-skipanini,* frágreiðing frá 2016, Hans Ellefsen og Heri á Rógvi

*Frágreiðing um skattlig viðurskifti í sambandi við FAS* frá 2016 (TAKS)

*Danmark i arbejde* – Vækstplan for det blå Danmark frá 2012

*Maritime muligheter – blå vekst for grønn fremtid – Regjeringens maritime strategi* – Noreg 2015

# Fylgiskjal 4

## Yvirlit yvir høvuðsniðurstøður- og átøk

| *Kapittul* | *Niðurstøða* | *Tilmæli* | *Ábyrgd* | *Kostnaður* | *Tíðarætlan* |
|---|---|---|---|---|---|
| ***Kap 2.1.1***<br><br>***Føroya Altjóða Skipaskrá*** | Ein fortreyt fyri, at skip undir føroyskum flaggi kunnu virka á altjóða marknaðinum, er, at føroyska sjóvinnulóggávan er dagførd samsvarandi altjóða krøvum, herundir í nóg góðari tíð innan altjóða gildiskomu.<br><br>Tað má vísast varsemi við at seta national eykakrøv ella serkrøv í gildi, tí hetta kann hava við sær verri kappingarføri fyri skip undir føroyskum flaggi. | – Føroyska sjóvinnulóggávan eigur framhaldandi at verða dagførd samsvarandi altjóða krøvum<br><br>Nóg mikið av umsitingarligari orku eigur at vera tøk, soleiðis at dagføringar av sjóvinnulóggávuni verða gjørdar í nóg góðari tíð, og settar í verk til tíðina.<br><br>Sjóvinnustýrið eigur at raðfesta gott samstarv við hini norðurlondini høgt. | UVMR/Sjóvinnustýrið | Verandi kostnað | |
| ***Kap 2.1.2***<br>***Føroya Altjóða Skipaskrá*** | Ein fortreyt fyri, at FAS skal vera ein áhugaverd skipaskrá hjá reiðaríum at vera í, er, at føroyska flaggið er á hvíta lista hjá Paris Mou.<br><br>At gerast limur í Paris Mou hevði styrkt myndina av Føroyum, sum ein flaggstatur, ið tekur trygd á sjónum, herundir fyri sjófólk og umhvørvið, í álvara. Við at lima seg inn gerast Føroyar limur saman við 26 øðrum flaggstatum í heiminum, ið saman vilja virka fyri, at vánalig skip, sum ikki liva upp til altjóða trygdarstandardir, sleppa at sigla. | Neyðugt er, at seta nóg mikið av arbeiðsorku av til at hava neyðugt eftirlit og neyðugt samskifti við reiðarí og skip um galdandi og nýggjar reglur, sum verða settar í gildi.<br><br>Mælt verður til at Føroyar verða limaðar inn í Paris Mou.<br><br>Mælt verður til at føroyskir myndugleikar framhaldandi lata seg góðskumeta av IMO. | UVMR/Sjóvinnustýrið | 350.000 kr í árligum limagjaldi<br><br>umframt tvey ársverk | 1. januar 2018 |
| ***Kap 2.2***<br><br>***Føroya Altjóða Skipaskrá*** | Fyri at fáa vøkstur í talinum av skipum, sum verða innflaggað skal FAS-skipanin marknaðarførast miðvíst. | Peningur verður játtaður á fíggjarlógini til marknaðarføring av skipanini. | UVMR/ Sjóvinnustýrið | Eitt ársverk | 2018 |
| ***Kap 2.3.1***<br><br>***Skattlig viðurskifti*** | Føroyski búskapurin fær lítið burturúr at útlendsk reiðarí kunnu skráseta síni skip í føroysku skattaskipanini uttan at flagga skipini inn í FAS | Mælt verður til at útfasa møguleikan hjá útlendskum reiðaríum at skráseta síni skip í føroysku skattaskipanini, uttan at tey eisini eru skrásett í føroyskari skipaskrá. | FMR/Taks | | Meting skal gerast um, hvussu hetta verður gjørt |

| Kapittul | Niðurstøða | Tilmæli | Ábyrgd | Kostnaður | Tíðarætlan |
|---|---|---|---|---|---|
| **Kap 2.3.2**<br><br>**Skattlig viðurskifti** | *Føroyskir løntakarar, sum arbeiða hjá útlendskum arbeiðsgevarum, fáa hægri skattafrádrátt enn løntakarar, sum arbeiða hjá føroyskum arbeiðsgevarum. Hetta stillar føroyskar arbeiðsgevarar/føroysk reiðarí verri í kappingini um føroyska arbeiðsmegi.* | *Mælt verður til, at gera broytingar í skattaskipanini soleiðis, at føroyskir og útlendskir arbeiðsgevarar ikki eru ymiskt stillaðir í kappingini um arbeiðsmegina.* | *FMR/Taks* | | *2018* |
| **Kap 2.4.1**<br><br>**Avtalur við onnur lond** | *Av tí, at Føroyar bert hava avtalu við Norðurlond um cabotagusigling, og ikki eru partur av ES, har cabotagusigling er loyvd í limalondunum, eru avmarkingar fyri, á hvørjum marknaðum skip í FAS kunnu útinna uppgávur. Somuleiðis avmarkar hetta, hvørji reiðarí velja at flagga síni skip inn í FAS.* | *Mælt verður til, at fara miðvíst eftir at fáa avtalur við ES ella við einstøk lond í ES um cabotagu-sigling. Sjóvinnustýrið eigur at taka stig til hvørji lond tað hevur størst týdning at byrja við, og saman við td. sendistovu Føroya í Brússel eiga fundir at fáast í lag.* | *UVMR* | | *2018* |
| **Kap 2.4.1**<br><br>**Avtalur við onnur lond** | *Orsakað av líkastillingasavtalu millum Føroyar og Danmark góðkenna Føroyar sjóvinnubrøv úr londum, sum Danmark hevur góðkent. Tørvur er á, at Føroyar sjálvt fær møguleika at viðgera vinnubrøv úr ávísum londum* | *Mælt verður til, at Sjóvinnustýrið finnur ein leist fyri, hvussu trupulleikin viðvíkjandi viðurkenning av útlendskum vinnubrøvum verður loystur.* | *UVMR/Sjó-vinnustýrið* | | |
| **Kap 2.4.1**<br><br>**Skattlig viðurskifti** | *Fyri føroyska vinnu sum heild, og harvið eisini føroysk reiðarí, hevði tað verið ein fyrimunur, um Føroyar fingu dupultskattaavtalur við fleiri lond.* | *Mælt verður til, at arbeiðið at gera fleiri dupult-skattaavtalur verður raðfest.* | *FMR/Taks* | | |
| **Kap 3.1**<br><br>**Førleikar, útbúgvingar og og skeiðstilboð** | *At eingin yvirskipað ætlan er fyri maritima útbúgvingarøkið og eingin samskipan av útbúgvingartilboðum metir arbeiðsbólkurin vera eina av fremstu forðingunum fyri øktari menning av maritimum útbúgvingum og skilabetri rakstri.* | *Mælt verður til, at farið verður undir at fremja tey átøk og tilmæli, ið hetta og eldri frágreiðingar mæla til um bygnað og innihald í maritimum útbúgvingum, herundir at báðir skúlarnir verða skipaðir í ein stovn við einari leiðslu* | *MMR* | *Eitt ársverk aftrat eigur at verða sett í MMR* | *2018* |

| Kapittul | Niðurstøða | Tilmæli | Ábyrgd | Kostnaður | Tíðarætlan |
|---|---|---|---|---|---|
| **Kap 3.2.1**<br><br>**Førleikar, útbúgvingar og og skeiðstilboð** | *Maritima útbúgvingarøkið vantar raðfesting í Mentamálaráðnum. Tað er ikki nøktandi, at so lítil umsitingarlig orka er til taks, at taka sær av bygnaði og innihaldi í sjóvinnu-útbúgvingunum.* | *Mælt verður til, at Mentamálaráðið setir nøktandi orku av at arbeiða við yvirskipaðum maritimum útbúgvingar-politikki, skúlabygnaði, fyrireiking av lóggávu, góðkenning av útbúgvingar-tilboðum og skeiðsvirksemi og at seta í verk altjóða krøv í føroysku útbúgvingarnar.*<br><br>*Tað hevur týdning, at raðfesta tætt samstarv millum avvarðandi myndugleikar á økinum, herundir Mentamálaráðið, Sjóvinnustýrið og Uttanríkis- og vinnumálaráðið.* | *MMR* | *Eitt ársverk aftrat eigur at verða sett í MMR* | *2018* |
| **Kap 3.2.2**<br><br>**Førleikar, útbúgvingar og og skeiðstilboð** | *Fleiri álit hava áður mælt til, at uppstiga maskinmeistara- og skipførara-útbúgvingarnar til bachelor útbúgvingar.* | *Mælt verður til, eins og í eldri álitum, at føroysku skipsførara- og maskin-meistaraútbúgvingarnar skulu uppstigast til bachelor útbúgvingar og harvið gerast partur av almennu standardunum fyri hægri útbúgvingar, t.e. Bologna avtaluni.* | *MMR* | | *2018-19* |
| **Kap 3.2.3**<br><br>**Førleikar, útbúgvingar og og skeiðstilboð** | *Vinnuháskúlin og Fróðskaparsetrið samstarva um at sameina verandi lærugreinar og læraraorku til at bjóða nýggjar útbúgvingar fram. Hetta gagnar bæði lesandi og lærustovnum og er ein gongd leið til framtíðar tættari samstarv og uppstigan og víðkan av maritimum útbúgvingum.* | *Fyrireikandi arbeiði, ið er í gongd millum Vinnuháskúlan og Setrið um at geva maskinmeistarum møguleika at uppstigast til bachelorar í el ella maskinverkfrøði, eigur at verða framt í verki.* | *MMR/ Vinnu- há-skúlin og Fróðskap-ar- setrið* | | *2017* |
| **Kap 3.2.4**<br><br>**Førleikar, útbúgvingar og og skeiðstilboð** | *Fyri at Føroyar kunnu bjóða maritimar førleikar á høgum støði er tað neyðugt, at verulig ferð verður sett á gransking á hesum øki.* | *Mælt verður til, at granskingar- og menningarverkætlanir innan maritima økið verða raðfestar sum eitt innsatsøki innan tær almennu granskingar- og stuðulsskipanirnar.* | *MMR/ Gran-skingar-ráðið* | | *2018-* |
| **Kap 3.3**<br><br>**Førleikar, útbúgvingar og og skeiðstilboð** | *Fyri at Føroyar kunnu gera seg galdandi sum maritimur útbúgvingardepil fyri sjó- og frálandavinnuna kring heimin krevjast dygdargóð og dagførd skeið til altjóða heimin.* | *Ein greitt orðað útbúgvingarstrategi skal seta mál fyri, at skúlarnir og privatir útbjóðarar í størri mun bjóða skeið fram til altjóða marknaðin. Mælt verður til, at skúlarnir fáa loyvi til at nýta ta inntøku skúlin hevur av skeiðsvirksemi til menning og íløgur í kravda útgerð, sum er kostnaðarmikil.* | *MMR/ Sjó- mans-skúlarnir* | | |

| Kapittul | Niðurstøða | Tilmæli | Ábyrgd | Kostnaður | Tíðarætlan |
|---|---|---|---|---|---|
| **Kap 3.4 Førleikar, útbúgvingar og og skeiðstilboð** | *Fyri at økja um áhugan fyri shipping og at fara undir reiðaravirksemi eru útbúgvingartilboð ein týðandi fortreyt.* | *Handilsskúlar og miðnámsskúlar eiga at skipa fyri, at hesi skeið og útbúgvingar verða boðin út:*<br><br>*Alment miðnámsskeið (GSK)*<br><br>*Shipping lærugreinar á búskaparbreyt og maritima leið á almennu miðnámsbreytini*<br><br>*Skipa eitt ella tvey ára útbúgving innan logistikk og shipping á handilsskúlunum omaná miðnáms- ella yrkisútbúgving* | *MMR og miðnáms-skúlar* | | *2018* |
| **Kap 4.2**<br><br>**Vinnuframa-skipanir og atgongd til váðafúsan kapital** | *Almennu vinnuframaskipanirnar eru smáar og spjaddar og gera lítlan mun fyri td. reiðarí vinnuna* | *Tað eigur at verða kannað, um allar tær smáu almennu vinnuframaskipanirnar kunnu savnast í ein felags nýskapanar- og vinnuframadepil, ið hevur ábyrgd av vinnuligari menning og altjóða marknaðarføring av føroyskum vinnum.* | *UVMR* | | *2018* |
| **Kap 5.1**<br><br>**Útinnan av tilmælunum og onnur maritim átøk** | *Tørvur er á at fara undir at orða eina maritima heildarætlan fyri Føroyar, har allur maritimi geirin, herundir serliga maritima tænastur, havnir, frálanda-virksemi, sjóvinnuumsiting o.a er umfatað og verður lýst og greinað.* | *Mælt verður til, at orða eina samlaða maritima strategi fyri Føroyar. Ein slík eigur at fevna um allar tættir í maritimum virksemi* | *UVMR saman við Maritimum Forum* | | *2017-2018* |
| **Kap 5.2**<br><br>**Útinnan av tilmælunum og onnur maritim átøk** | *Eitt endurskipað Maritimt Forum skal vera bindilið millum almennar myndugleikar og privatu vinnuna. Harafturat skal Maritimt Forum vera hoyringspartur og koma við tilmælum, m.a. um at seta nýggj átøk í verk.* | *Maritimt Forum verður endurstovnað.* | *UVMR* | | *2017* |



Uttanríkis- og Vinnumálaráðið